ISBN 99918-955-8-2

# Lærari í Føroyum 2002

## - limakanning hjá Føroya Lærarafelag

Bjarni Mortensen

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 2/2002**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýbd enn verulig granskingarprojekt. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. kanningararbeiði sum granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarprojektum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivaði á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnaði til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

# Innihaldsyvirlit

Formæli....4
1. Endamál, ástøði og framferðarháttur....5
1.1. Endamál við kanningini....5
1.2. Ástøðiligt grundarlag....6
1.2.1. Refleksiva samfelagið....7
1.2.2. Sosialisering í refleksiva samfelagnum....8
1.3. Framferðarháttur....9
1.3.1. Styrkir og veikleikar....9
1.3.2. Netverk lærarans....11
1.3.3. Datainnsavningin....12
2. Trivnaður lærarans– almenn lýsing....14
2.1. Nøgdsemi sum heild....14
2.1.1. Tað góða arbeiði....16
2.1.2. Arbeiðstíð og -viðurskifti....18
2.1.3. Skrivligu viðmerkingarnar....19
2.2. Samandráttur....21
3. Innanhýsis viðurskifti lærarans....22
3.1. Lærarin og næmingarnir....22
3.1.1. Uppalingarliga uppgávan....23
3.1.2. Næmingalagað undirvísing....25
3.1.3. Ráðlegging, toymi, fundir o.a.....28
3.1.4. Samrøður við leiðsluna....29
3.1.5. Ráðleggingartoymi....30
3.1.6. Viðurskiftini í flokkinum....32
3.1.7. Luttøkan hjá næmingunum....34
3.2. Lærarin og starvsfelagar....35
3.2.1. Starvsfelagar....35
3.2.2. Ósemjur....36
3.2.3. Leiðslan....37
3.2.4. Fakliga umhvørvið....37
3.3. Fysisku karmarnir....38
3.4. Næmingar við serligum tørvi....38
3.5. Samandráttur....39
4. Uttanhýsis viðurskifti lærarans....41
4.1. Nýggj lóg og tiltøk....41
4.2. Førleiki og eftirútbúgving....42
4.3. Viðurskiftini millum lærarar, foreldur og almenningin....45
4.4. Lærarar og foreldrini....46

4.5. Samandráttur ... 47
5. Tey ónøgdu og tey nøgdu ... 49
5.1. Arbeiðstíð og – mongd ... 50
5.2. Nýggj tiltøk ... 51
5.3. Næmingarnir ... 53
5.4. Starvsfelagar og leiðsla ... 54
5.4.1. Starvsfelagar ... 55
5.4.2. Ósemjur ... 56
5.4.3. Fakliga umhvørvið ... 57
5.4.4. Leiðslan ... 58
5.5. Fakligur førleiki ... 58
5.7. Samandráttur ... 58
6. Niðurstøður ... 60
6.1. Almen lýsing av trivnaði lærarans ... 60
6.2. Innanhýsis viðurskifi ... 61
6.3. Uttanhýsis viðurskifti lærarans ... 63
6.4. Vandar og møguleikar ... 63
Keldulisti ... 66

# Formæli

Hvussu er tað at vera lærari í Føroyum í dag? Hetta er høvuðsspurningurin, ið verður greinaður í hesi frágreiðingini.

Frágreiðingin byggir á eina størri spurnarblaðskanning, sum eftir áheitan frá Føroya Lærarafelag varð gjørd millum limir felagsins í desember mánaða 2001. Høvuðsviðgerðin av hesum tilfari, t.v.s. viðgerð og tulking, varð gjørd í januar, februar og mars mánaða 2002.

Orsøkin fyri at seta kanningina í verk, er grundað á ta sannroynd, at stórar broytingar eru farnar fram innan fólkaskúlan seinastu ártíggjuni. Nógv rumbul hevur eisini verið um skúlan seinastu árini, og tað tykist sum, at ónøgdin við lærarastarvið yvirhøvir er vaksandi. Kanningin hevur til endamáls at seta orð á, hvat lærarin sjálvur heldur um sína støðu, og á hendan hátt fáa til vega ein hollan og fjølbroyttan kunnleika um støðuna hjá føroyska fólkaskúlalæraranum.

Frágreiðingin er gjørd á Granskingardeplinum fyri Økismenning, fyristaðin av Bjarna Mortensen, samfelagsfrøðingi. Harumframt hevur Føroya Lærarafelag sett ein bólk, sum hevur havt sum uppgávu at fylgja og stuðla arbeiðinum. Í hesum bólki hava sitið: Anna Dalsgarð, Jórun Eið, Beinta Vang, Heidi Petersen, Elsa Birgitta Petersen og Símun Abrahamsen. Hesin bólkur hevur veitt mær góðan stuðul í arbeiðsgongdini, sum eg takki fyri. Eisini hava Gestur Hovgaard og Dennis Holm veitt góða hjálp. Teir feilir og tey lýti, ið kunnu vera í frágreiðingini eru mín ábyrgd.

At enda skal sigast, at talan er um fyrstu stór kanningina av sínum slagi í Føroyum. Sostatt er fingið til vega eitt ávíst grundtilfar, sum vónandi kann vera við til at stimbra eitt framhaldandi orðaskifti og útgreiningararbeiði til frama fyri føroyska skúlaverkið.

Apríl 2002

Bjarni Mortensen

# 1. Endamál, ástøði og framferðarháttur

## 1.1. Endamál við kanningini

Fólkaskúlin hevur ein høvuðsleiklut í okkara samfelagsmenning, og hesin týdningur tykist vaksandi. Orsøkin er, at vit liva í einum samfelagi, har fortreytirnar hjá fólki, bygdum, økjum og londum at mennast alsamt meiri, gerst vitan og evnini at læra. Hugtøk sum kunnleikasamfelagið, kunningarsamfelagið, tøknisamfelagið, "the learning economy", "the new economy" verða í dag nógv nýtt at lýsa hendan týdningin.

Fólkaskúlin tekur sær í stóran mun av tí grundleggjandi lærdóminum hjá komandi ættarliðum. Kendi amerikanski búskaparfrøðingurin John Kenneth Galbraith lýsti greitt týdningin av hesum lærdómi við at siga, at ”*størsti sannleikin í okkara tíð er, at ongin tjóð, har fólk duga at lesa og skriva, er fátøk, meðan allar meiri ella minni analfabetiskar tjóðir eru fátækar.*”

Lærarin er høvuðsleikarin í fólkaskúlanum, har umleið 650 lærarar arbeiða við at geva umleið 7.000 næmingum grundleggjandi lærdóm (Hagstovan 2001: 283[1]). Stórur tørvur er í dag á nýggjum lærarum, tí heili 10 % av núverandi lærarunum innan fólkaskúlan, hava ikki læraraútbúgvingina (Sosialurin, 25/10 2001). Tað er tí av alstórum týdningi, at lærarayrkið verður so lokkandi, at nóg nógv ung fólk søkja hetta yrkið.

Týdningarmikið er eisini, at núverandi lærarar trívast so væl í teirra dagliga yrki, at teir eisini framhaldandi ynskja at arbeiða í føroyska fólkaskúlanum.

Men hvussu er støðan í dag? Hvussu kennist tað at vera lærari í Føroyum? Dáma lærarum teirra arbeiði? Ella kenna teir seg kroystar millum nógv ymisk krøv frá t.d. næmingum, foreldrum, politisku skipanini, almenninginum, teirra egna fakliga stoltleika og „avtakarunum“ (t.d. vinnulívi og miðnámskúlum)? Nevndin í Føroya Lærarafelag hevur gjøgnum longri tíð verið varug við, at øktir trupulleikar eru í lærarastarvinum. Hesir trupulleikar síggjast aftur í tí samskifti, sum felagið hevur við limir sínar, og endurspeglast í, at nógvir lærarar fara í onnur størv.

At trupulleikar eru í fólkaskúlanum endurspeglast eisini í almenna orðaskiftinum, har hesir í longri tíð hava verið eitt afturvendandi evni (sí t.d. Sosialurin 19/09-2001; 04/09-2001; 28/08-2001; 15/08-2001; 22/05-2001; 21/03-2001; 20/12-2000).

Hóast negativu søgurnar kunnu tykjast ráðandi, so er veruleikin ikki so einfaldur. Onkur hevur eisini víst á, at lærarar við teirra undirvísingarroyndum, møguleikum at taka skeið,

[1] Hetta eru lønartímar um vikuna roknaðir um til ”lærarastørv”/ársverk (Hagstovan, 2001: 283).

og royndum at samstarva við starvsfelagar, næmingar, foreldur og myndugleikar hava góðan førleika at røkja onnur áhugaverd størv (Dimmalætting 01/12-2001) og er hetta eisini ein orsøk til at lærarar skifta starvsøki.

Dømini omanfyri vísa, at talan heldur er um ein samansettan (kompleksan) trupulleika, nakað sum útlendskar kanningar eisini greitt benda á.

Tað er við støði í omanfyrinevndu viðurskiftum, at spurningurin í verður viðgjørdur í hesi kanning er:

| Hvussu er tað at vera lærari í føroyska fólkaskúlanum í dag? |
|---|

At hendan heldur breiða orðingin er vald, skyldast fyrst av øllum, at okkara vitan um starvs- og trivnaðarviðurskifti í fólkaskúlanum er lítil. Ongin siðvenja er fyri at gera kanningararbeiði av hesum slagi, og nærum ongin føroysk pedagogisk gransking finst. Hendan kanningin hevur tí eitt leitandi endamál, har roynt verður at koma inn á so nógv viðurskifti í gerandisdegi lærarans, sum vit halda hevur verið forsvarligt.

Spurningurin leggur tó eisini upp til eina forklárandi viðgerð av viðurskiftum lærarans, t.v.s. eina lýsing av trupulleikum eins væl og teimum góðu viðurskiftinum í lærarastarvinum. Hetta partvís fyri at skapa eina fjølbroytta mynd av dagliga veruleikanum í fólkaskúlanum, partvís fyri at nærkast einum svari uppá, hvat skal til, fyri at lærarar skulu verða nøgdir í sínum arbeiði.

Frágreiðingin er býtt í seks partar. Hesin fyrsti parturin leggur fram høvuðsevnið og ástøðiliga grundarlagið fyri arbeiðinum, umframt eina gjøgnumgongd av framferðarháttinum (háttalagnum) í kanningini. Annar partur er ein almenn lýsing av, hvussu føroyski fólkaskúlalærarin upplivir tað at vera lærari í dagsins skúlaverki. Triði og fjórði partur útgreina nærri ta almennu lýsingina, har viðurskifti lærarans vera býtt uppí ávikavist innanhýsis (3. partur) og uttanhýsis (4. partur) viðurskifti (sí eisini niðanfyri). Fimti partur er ein samanbering av hvussu tey nøgdu og tey ónøgdu (í kanningini) lýsa viðurskiftini. Við hesum grundarlagi verður eisini víst á, á hvørjum økjum átøk kunnu gerast fyri at betra um viðurskifti lærarans. Sætti partur er ein samanumtøka og niðurstøða av frágreiðingini.

## 1.2. Ástøðiligt grundarlag

Tað ástøðiliga grundarlagið skal her skiljast sum ein almenn tilgongd til hvørji samfelagslig viðurskifti hava týdning fyri virksemi og trivnaði lærarans. Eyðsæð er, at stórur munur er á lærarastarvinum í dag í mun til fyri fáum ártíggjum síðani. Stórar samfelagsligar

broytingar hava verið, og spurningurin er, hvat hesar broytingar merkja fyri lærarans virksemi.

### *1.2.1. Refleksiva samfelagið*

Vanligt er í samfelagsástøði at lýsa grundleggjandi samfelagsligar broytingar sum eitt skifti frá einum tradisjonellum til eitt modernað samfelag. Tey sera djúptøknu samfelags-ligu umskiftini seinastu ártíggjuni merkja, at vit eru við at fara út úr tí moderniseringini, ið eyðkendi ídnaðarsamfelagið, og inn í eina modernisering, sum sosiologiin nevnir “refleksiv modernisering”.

Hesin refleksivitetur stavar millum annað frá, at núverandi samfelagið er vorðið eitt “møguleikasamfelag”, sum vit millum annað uppliva tað gjøgnum øgrynnuna av informasjónskeldum, infraskipanum og útbúgvingartilboðum. Í okkara hugaheimi eru vit sostatt langt síðani vorðin “global”. Ótømandi møguleikarnir at skapa “tað góða lívið” merkja eisini, at tann einstaki alla tíðina má umhugsa og grundgeva fyri teimum valum, ið gjørd verða. Refleksiv modernisering merkir sostatt, at einstaka menniskjað meiri enn nakrantíð áður er tvungið at fyrihalda seg til sín sjálvs og síni egnu viðurskifti, at skipa sítt egna “lívsprojekt”.

Hinvegin merkir refleksiva samfelagið eisini, at tað hendir eitt tap av nærleika og trygg-leika hjá tí einstaka. Tær samansjóðandi kreftirnar í samfelagnum, familja, bygd og statur eru í stórari broyting, og tí er samfelagið fyri einum uppbroti: sosialt, mentunarliga og búskaparliga (Hovgaard, 1998). Við refleksiva samfelagnum fylgja tí ikki bara ein øgrynna av møguleikum, men hetta samfelagið er eisini eitt “risikosamfelag”, sum týski sosiologurin Ulrich Beck hevur kallað tað. Havið av valmøguleikum ger, at vandin fyri at velja skeivt eisini er tað størri, samstundis sum vit enn meiri gerast varug við teir vandar, ídnaðarsamfelagið eisini hevur ført við sær: náttúruoyðingar, ovfisking, neytaøði og veðurlagsbroytingar fyri bert at nevna nøkur dømi.

Meðan vit fyrr vóru partur av størri og meiri eintáttaðum felagsskapum, har yngra ættarliðið ofta fylgdi í fedranna fótasporum, og har flyting bert kom uppá tal, tí man skuldi lív-bjarga sær, eru vit í dag vorðin individualiseraði og mobil. Individualisering og mobili-tetur geva eitt frælsi, men hevur eisini vandamál við sær. Rótloysi, samleikatrupulleikar, útstoyting og arbeiðsloysi eru millum mest vanligu samfelagsstrupulleikar í Europa í dag.

Fyri at viga upp ímóti vandunum í refleksiva samfelagnum er útbúgving eitt av lykla-orðunum, sum skulu skapa nýggjar formar fyri samanhald og framburð. Útbúgving er vorðin lyklaorðið til búskaparliga menning, og samstundis tann leiðin, sum uppvaksandi ættarliðið roynir at skapa sær nærleika og tryggleika við (Hovgaard, 1998).

### *1.2.2. Sosialisering í refleksiva samfelagnum*

Sosiala tilveran byggir á nakrar staðbundnar normar, vanar og felags virði, sum aftur hava ávirkan á, hvussu tann einstaki limurin í samfelagnum hugsar og handlar. Gjøgnum sosiala samanspælið vera nýggir normar og nýggj virði skapað, meðan onnur vikna og hvørva, og tað er í hesum samanhangi og samanspæli, at menniskju verða formað. Tað er hendan formingin av menniskjanum vit kalla fyri *sosialisering* (Jacobsen et. al., 1999).

Í eini nútímans sosialiering eru vit nærum frá vøggu til grøv tætt knýtt at samfelagsligum stovnum (institusjónum): sum barn í vøggustovu, barnagarði og skúla, sum ung í læru ella undir útbúgving, sum vaksin gjøgnum okkara tilknýti á arbeiðsmarknaðinum, og sum gomul gjøgnum eldrarøkt, ellisheim v.m.

Grundsteinurin í sosialiseringini verður tó lagdur í barndóminum, herundir sjálvsagt ta tíðina børnini eru í skúlanum. Við teimum broytingum, sum eyðkenna refleksiva samfelagið, er sosialiseringin vorðin ein heilt onnur enn tann ið eyðkendi ídnaðarsamfelagið.

Skúlin í eftirkrígstíðini lærdi fyrst og fremst børnini um tað, sum mett var at vera grundleggjandi virði: tjóðina, kongshúsið, familjuna, kristindómin v.m. Síðani vann førleikahugsanin frama, har skúlin skuldi laga næmingarnar til at uppfylla ávísar samfelagsligar uppgávur í einum alt meiri teknologiskt framkomnum samfelagi (Thomsen, 1998). Í dagsins samfelagi er tað so, at bæði grundleggjandi virðini og teknologiin eru fyri uppbroti,og harvið fær skúlin ein annan leiklut.

Skúlin í refleksiva samfelagnum tekur sær alt meiri av teimum sosialiseringsuppgávum, ið hava við menningina av tí einstaka at gera, uppgávur sum fyrr vóru í familjuni og gerandisdegnum. Tá ið samfelagið gerst alt meiri fjøltáttað, er tað ikki longur – ella bara - í familjuni, at ein felags búgving verður skapað. Tí er hetta ’flutt’ inn í skúlan. Harafturat kemur, at kunnleikamenningin ikki longur er standardiserað, og krevur tí, at vitan lærarans støðugt verður dagførd.

Nevndu viðurskifti broyta sjálvt undirvísingarmynstrið, tí undirvísingin kann ikki grundast á ”einvegis samskifti” frá lærara til næming, men gerst partur av einum meiri umfatandi samskifti millum lærara, næming og restina av samfelagnum. Stuttsagt, so skulu næmingar í refleksiva samfelagnum læra at reflektera og skapa sítt egna lívsprojekt, t.v.s. sjálvir vera við til at skapa tann kunnleika, sum ger tað møguligt hjá teimum at orientera seg í ”møguleikasamfelagnum”, lokalt eins og globalt. Nýggja fólkaskúlalógin við sínum krøvum um toymi og næmingalagaða undirvísing, umframt vektanin av evnislagaðum arbeiði og vallærugreinum, eru dømi um hesa gongd.

Hvat hava hesi viðurskifti so við trivnaðin hjá lærararunum at gera? Stutt kann tað lýsast so, at meðan lærarin fyrr var nærum einaráðandi innan teir fýra veggirnar, skal hann í dag

alla tíðina grundgeva fyri sínum avgerðum: yvirfyri næmingunum, fyri leiðslu/stýri, foreldrum og umgevandi samfelagnum. Lærarastarvið er sostatt ógvuligani týðiliga merkt av rákinum at "refleksiva samfelagnum", og lærarin er harvið vorðin partur av einum størri "netverki" av relasjónum, sum sjálvsagt ávirka hansara trivnað sum lærari. Hetta netverk skulu vit greina nærri í komandi broti um framferðarháttin í kanningini.

## 1.3. Framferðarháttur

Endamálið við hesum partinum er at leggja fram, hvør framferðarháttur er nýttur í sambandi við kanningina. Grundleggjandi kann man innan samfelagsfrøði býta háttaløg upp í tveir høvuðsbólkar, kvalitativ og kvantitativ. Í kvalitativum kanningarháttum tulkar man eitt tilfar út frá eitt nú samrøðum, tekstum og eygleiðingum, har tilgongdin er rættuliga opin fyri, hvat hevur týdning og ikki. Hvat hevur týdning, er nakað sum kemur fram í sjálvari gongdini. Í kvantitativum kanningum verður frammanundan gjørt av, hvat hevur týdning. Har eru spurningarnir tí eisini fastlagdir frammanundan, og endamálið er at seta tøl á (kvantifisera) veruleikan. Tað er hetta seinna slagið av kanning, ið er grundarlagið undir hesari frágreiðing.

Hvat slag av kanning ein velur, veldst um endamálið og hvørjar resursir eru til taks. Umframt hesi viðurskifti, so eru tað ein røð av viðurskiftum annars, ið ávirka kanningina. Hesi viðurskifti koma vit nærri inn á í parti 1.3.1. um *styrkir og veikleikar*.

Sum víst á frammanfyri, so eru samfelagsliga ávirkanin og krøvini kring læraryrkið alsamt vaksandi, og gera hesi viðurskifti, at tað netverk, sum dagliga ávirkar yrki lærarans, bæði er meiri umfatandi og kravmiklari enn áður. Fyri framferðarháttin er tí avgerandi at fáa greiði á, hvat meinast við netverk lærarans, og verður hetta gjørt í parti 1.3.2. um *Netverk lærarans*.

Í parti 1.3.3. um *datainnsavnan* verður víst á, hvussu innsavnanin av data hevur verið gjørd, hvussu viðgerðin av hesum data er farin fram, umframt at mett verður um dygdina av innkomnu tilfarinum.

### *1.3.1. Styrkir og veikleikar*

Fyrimunurin við at nýta spurnarblaðskanning er, at finnast kann fram til, hvussu útbreiddar ymiskar meiningar eru í einum ávísum bólki av fólki, í hesum føri limir Føroya Lærarafelags. Til dømis, hvat eyðkennir lærarar, sum ávíkavist trívast/ikki-trívast í teirra starvi? Er tað ein samanhangur millum trivnaðin og trúgv á egnan fakligan førleika? Eru tað viðurskiftini við næmingarnar, sum eru avgerandi fyri trivnaðin?

Eisini ber til at skipa tilfarið, eitt nú við at kannað munin millum trivnaðin hjá ymsum bólkum innan tann samlaða bólkin, sum kannaður verður. Hvør munur avspeglast millum eitt nú tey ungu og tey eldru, kvinnur og menn o.s.frv.

Ein vanligur kritikkur av kanningum av hesum slagi er, at spurningarnir eru fastlagdir frammanundan, og harvið eisini svarmøguleikarnir. Harvið er altíð vandi fyri, at viðkomandi upplýsingar verða mistir. Í hesari kanningini høvdu fólk møguleika at gera skrivligar viðmerkingar um, hvussu tað er at vera lærari í Føroyum. Umleið helvtin hevur brúkt hendan møguleikan og minkar hetta henda veikleika. Tær skrivligu viðmerkingarnar eru í viðgerðini serliga brúktar sum dømi um, hvat liggja kann aftanfyri ymsu meiningarnar.

Ein annar veikleiki er, at vissa ikki er fyri, at persónurin, ið svarar, skilur spurningin sum ætlað. Harumframt vil altíð vera ógreitt, um tað eru nøkur serstøk eyðkenni við teimum persónunum, sum hava valt at svara, mótvegis teimum, sum hava valt ikki at svara. Í báðum førum kann úrslitið ávirkast, men hesir veikleikar kunnu minkast gjøgnum arbeiðið við datainnsavning (sí 1.3.3.).

Í kanningini verður ikki spurt, hvørjum skúla lærararnir arbeiða í. Tá ið tað er í einum heilt ítøkiligum skúla tann einstaki lærarin starvast, og hesin skúli tí greitt hevur stóra ávirkan á trivnaðin hjá lærarunum, so kundi tað verið ein fyrimunur at vita hetta. Hinvegin hevði vandi verið fyri, at nógv høvdu aftrað seg at svara, júst tí svarini beinleiðis kundu knýtast aftur til egnan skúla. Og tá endamálið við kanningini ikki er at kanna ”skúlar”, men lærarar, hevði hetta verið óheppið.

Sum nevnt í innganginum, so er vald ein breið tilgongd til spurningin, hvussu tað er at vera lærari í Føroyum í dag, tí tað er fyrstu ferð hesi viðurskifti verða kannaði. Tá ið ein fer í breiddina, missir man altíð nakað í dýpdini. Nøkur av einstøku evnunum, ið viðgjørd eru, eru sera umfatandi. Skulu tey lýsast til fulnar, so krevur tað, at tey verða kannaði fyri seg.

Styrkin er, at man fær eina greiða ábending um, hvørji viðurskifti ávirka trivnaðin hjá lærarunum, og sostatt eisini eina greiða ábending um, hvar hvar fakfelagslig og politisk tiltøk skulu gerast. Kanningin gevur soleiðis eisini eitt gott grundarlag fyri framhaldandi arbeiði. Her er eitt grundtilfar, ið onnur við áhuga fyri lærarans og skúlans viðurskiftum kunnu nýta. Eitt nú er gjørligt at fara í dýpdina við eini kvalitativari kanning við einum ella fleiri av teimum viðurskiftum, sum hendan kanningin viðgerð. Kanningin gevur kanska lesandi innan námsfrøði ella umsiting eitt gott støði at byrja eina serritgerð, og kann alment sæð vera til gangs fyri víðari arbeiðið á hesum øki.

### *1.3.2. Netverk lærarans*

Í dagsins samfelagi eru tað ein røð av ”nýggjum” viðurskiftum, sum alla tíðina eru við til at broyta og seta krøv til lærarastarvið, soleiðis sum víst hevur verið á omanfyri. Serliga tykjast krøvini uttanífrá at vera vaksandi, soleiðis sum tað endurspeglast í vaksandi almennum krøvum og einum meiri ”krevjandi” umhvørvi av næmingum og foreldrum. Harvið eru tað sjálvsagt eisini ein røð av nýggjum og broytum viðurskiftum, sum ávirkað trivnaðin hjá lærarum og hugin at vera lærari. Í viðgerðini hava vit valt at skilja millum tvey grundleggjandi viðurskifti: *innanhýsis viðurskifti* og *uttanhýsis viðurskifti* lærarans.

Innanhýsis viðurskiftini kunnu sigast vera kjarnuviðurskifti lærarans, serliga viðurskiftini við næmingarnar. Hartil koma eisini viðurskiftini við starvsfelagar og leiðslu, umframt at teir fysisku karmarnar, tvs. bygningar, stovur og útgerð, eisini verða mett at hava týdning fyri trivnað og arbeiðshug hjá tí einstaka læraranum og roknaði sum partur av innanhýsis viðurskiftunum. Tey týdningarmiklu innanhýsis viðurskifti lærararans eru lýst á mynd 1.

**Mynd 1. Innanhýsis viðurskifti skúlans**




Við uttanhýsis viðurskifti skal eitt nú skiljast tey alment settu krøvini, sum lærarin er undirlagdur í sínum dagliga yrki, tað vil siga lógarverkið, eftirlitið, kunngerðir v.m. Krøvini til læraran verða tó eisini sett av øðrum pørtum, sum eru uttanfyri dagliga arbeiðið í skúlanum. Her verður serliga hugsað um foreldur og sosiala (nær-)umhvørvið annars, umframt møguleikarnar fyri fakligari/persónligari menning. Fakliga/persónliga menningin er eitt nú møguleikarnir fyri eftirútbúgving, skeiðvirksemi v.m., sum lærarin aloftast má nema sær uttanfyri skúlan. Hesi viðurskifti vera lýst á myndini niðanfyri.

**Mynd 2. Uttanhýsis viðurskifti lærarans**




Bæði innanhýsis og uttanhýsis viðurskifti ávirka í stóran mun arbeiðs- og trivnaðarviðurskiftini hjá lærarum. Hvørt av hesum viðurskiftum inniheldur eitt sera stórt netverk av sambondum, ið tann einstaki lærarin er partur av, og sum geva honum/henni upplivingar og royndir, sum ávirka trivnaðin. Tað eru hesi viðurskifti, sum eru grundarlag fyri datainnsavnanina.

### *1.3.3. Datainnsavningin*

Fyrsti parturin av datainnsavningini er gerð av spurnarblaði, sum sjálvsagt fevnir um tey yvirskipaðu viðurskiftini, ið nevnd eru omanfyri. Eitt sindur ymiskt er, við hvørjari tyngd hetta er gjørt innan hvørt øki, men er hetta vigað eftir hvønn týdning vit hava lagt í hesi.

Sum fyrireiking til gerð av spurnarblaðnum eru gjørdar persónligar samrøður við nakrar lærarar í fólkaskúlanum, umframt at bólkasamrøður hava verið við fylgibólkin og umboð fyri nevndina í Føroya Lærafelag. Hesar samrøður høvdu til endamáls, at seta greiðari orðingar á, hvørji evnið kanningin skuldi leggja dent á. Umframt hetta, er eisini íblástur fingin til vega frá líknandi útlendskum kanningum. Hetta ger, at partar av kanningini kunnu samanberast við útlendsk úrslit. Tá ið spurnarblaðið varð orðað, varð tað sent fakfólki til viðmerkingar, sum sostatt hava hjálpt til at fáa gjørt spurningarnar so greiðar og viðkomandi sum gjørligt.

Spurnarbløðini vóru send til allar aktivar limir Føroya Lærarafelags, tilsamans 735 í tali[2], og av hesum hava 309 valt at svara. Svarprosentið er sostatt 42. Allarhelst hevði svarprosentið verið eitt sindur betri, um ikki spurnarbløðini vórðu send út stutt undan jólum, men

[2] Spurnarblaðið bleiv sent til allar limirnar hjá Føroya Lærarafelag uttan eftirløntu og serligu/hvílandi limirnar.

var hetta neyðugt, um kanningin skuldi gerast liðug, sum ætlað. Fyri nøkur hevur stutta tíðarfreistin kanska havt sína ávirkan. Tíðarfreistin bleiv tó longd fram til fyrst í januar 2002.

Roknast má við, at limir í lærarafelagnum, sum hava verið í langari fráveru frá lærara starvinum, eitt nú vegna sjúku, annað arbeiði ella farloyvi, hava valt ikki at svara. Tað var ikki gjørligt at sálda hesar limir frá frammanundan, men styrkir hetta kanska verandi svarprosent nakað.

Samanumtikið er niðurstøðan tó, at svarprosentið er nóg nøktandi til at kanningin kann nýtast at siga nakað munagott.

Ein annar háttur at meta um dygdina av tilfarinum gerst við at hyggja eftir, hvussu væl innkomna tilfarið umboðar samlaða bólkin av fólki. Av innkomna tilfarinum sæst, at kynsliga, aldurs og landafrøðiliga býtið í teimum svaraðu spurnarbløðnum er rættuliga gott í mun til veruliga býtið[3].

Niðurstøðan er sostatt tann, at tilfarið gevur eitt nøktandi grundarlag fyri at meta um trivnaðin hjá fólkaskúlalæraranum í Føroyum.

---

[3] Tølini fyri veruliga býti eru fingin til vega frá Mentamálastýrinum, tó undantikið tølini fyri kynsbýti sum eru frá Føroya Lærarafelag.

# 2. Trivnaður lærarans– almenn lýsing

Í hesum partinum viðgera vit almenna svarið uppá spurningin um trivnað lærarans. Fyrst viðgera vit nøgdsemið, t.e. hvussu føroyski lærarin almennt sæð heldur seg trívast í sínum starvi. Harnæst fara vit inn á nøkur viðurskifti, sum beinleiðisknýta seg at lærarastarvinum og ”nøgdsemi”, t.v.s., hvat lærarar halda vera ”tað góða arbeiðið”, umframt teirra almennu arbeiðstreytir, so sum tímatal v.m.

## 2.1. Nøgdsemi sum heild

Hendan kanningin vísir, at flestu lærarar, 73 %, sum heild siga seg vera nøgdar í sínum starvi. Av hesum eru tað 14 %, sum í stóran mun siga seg vera nøgdar. Eftir eru góð 27 %, sum siga, at tey einans í minni mun ella als ikki eru nøgd við sítt starv.

Í fimta parti í hesi frágreiðingini verða viðurskiftini millum hesar báðar bólkar greinaðir: t.v.s. teir tríggjar fjórðingar vit kunnu kalla ”tey nøgdu” og tann fjórðingin, ið vit kunnu kalla ”tey ónøgdu”. Hvat eyðkennir hesar báðar bólkar? Hvørji viðurskifti eru lærarar ávíkavist nøgdir/ó-nøgdir við? Í hvønn mun og hvussu ávirkar hetta teirra trivnað?

Í fyrstu atløgu kann staðfestast, at um fjórði hvør lærari einans í minni mun ella als ikki, er nøgd(ur) við sítt starv, ja so er talan um ein markantan trupulleika. Eitt stórt ónøgdsemi gevur lærarunum ringar fortreytir at útinna eitt gott arbeiði, persónliga eins væl og fyri skúlaverkið sum heild.

Hesin trupulleikin verður øktur av tveimum viðurskiftum.

**Nógv eru nøgd við teirra arbeiði,**




Sp.: Ert tú sum heild nø gd(ur) í tínum arbeiði?

**men nøgdsemi broytt til tað verra**




Sp.: Er títt nø gdsemi við arbeiði broytt seinnu árini?

Fyrst er tað rættuliga umhugsunarvert, at 47 % siga, at teirra nøgdsemi við arbeiðið er broytt til tað verra seinnu árini, meðan einans 12 % siga seg vera meiri nøgd við teirra starv í dag, enn fyri nøkrum árum síðani.

Harnæst er tað eitt vanligt sjónarmið millum lærarar, at ónøgdin sum heild er blivin størri. Hetta verður staðfest í myndini niðanfyri, sum vísir, at 79 % uppliva, at ónøgdin millum lærarar sum heild er økt, antin í ávísan ella í stóran mun. Hetta er eitt sigandi høgt tal, og vísir greitt, at nøkur viðurskifti ikki eru sum tey eiga.

**Ónøgdin vaksin seinastu 10 til 15árini**




Sp.: Heldur tú, at ónøgdin ella nøgdsemið millum lærarar sum heild eru broytt tey seinastu 10 til 15 árini?

Við øktu ónøgdini í huga, er tað ikki so løgið, at fleiri enn helvtin av teimum, ið svaraðu spurnarblaðnum, siga seg av álvara hava umhugsað at søkja annað starv seinastu árini.

**Meiri enn helvtin av lærarunum umhugsa at søkja annað starv**




Sp.: Hevur tú av álvara umhugsað at søkja annað starv?

Ikki óvæntað eru tað í størri mun tey, sum siga seg ikki vera nøgd við teirra arbeiði, ið umhugsa at søkja annað arbeiði. 54 % siga, at tey av álvara hava umhugsa at søkja annað starv. Heili 83 % av teimum, ið eru serliga ónøgd við lærarastarvið, hava eisini umhugsað at søkt annað arbeiði.

Um orsøkirnar til, at lærarar siga seg hava umhugsað at søkja annað starv, er tað serliga tað, at arbeiðið er ov strævið, sum verður framborið (51 %). Hinvegin sigur ein stórur bólkur, at ynskini um at royna nakað nýtt og fáa nýggjar avbjóðingar, hava stóran týdning (ávikavist 48 % og 35 %)[4]. Minni týðandi er, at 33 % umhugsa at søkja annað arbeiði, orsaka av ósemjum ella tí viðurskiftini við næmingarnar ikki eru nóg góð. Tað eru 11 %, sum antin ikki grundgeva, ella siga tað vera aðrar orsøkir enn omanfyri nevndu, at tey umhugsa at søkja annað starv. Fleiri av hesum hava skrivað, at orsøkin til, at tey hava umhugsað at søkja annað starv, er, at tey ynsktu eina hægri løn. Í skrivligu viðmerkingunum eru eisini nógv sum hava gjørt vart við, at tey halda seg fáa eina ov lítla løn í mun til lestrartíðina og ta arbeiðisorku, teirra starv krevur (sí niðanfyri).

**Hugsað um at søkja annað starv m.a. tí arbeiðið er ov strævið**




Sp.: Hví hevur tú umhugsað at søkt annað starv?

Samanumtikið sigur hetta okkum, at tey, ið umhugsa eitt frával av lærarastarvinum, grundað hetta bæði á negativar og positivar royndir við lærarastarvinum. Alt bendir tó á, at negativ viðurskifti, eitt nú meiri tyngjandi arbeiðsbyrða, eru av vaksandi í týdningi.

### *2.1.1. Tað góða arbeiði*

Myndin niðanfyri vísir, hvat lærarar halda hevur størstan týdning, tá ið teir lýsa hvat teir skilja við ”tað góða arbeiðið”. Dámligir starvsfelagar, góð løn og spennandi avbjóðingar eru tað, flestu lærarir halda hevur týdning.

[4] Legg til merkis, at tey, ið svaraðu, kundu seta fleiri krossar, og tí geva prosentini ikki 100, um tey verða løgd saman.

## Hvat merkir tað góða arbeiði fyri lærarar?




Sp.: "Tað góða arbeiði" – hvat merkir tað fyri teg?

Áhugavert er, at møguleikarnir fyri at koma í hægri starv ikki er nakað, ið hevur stórvegis týdning. Hetta vísir helst, at tað sum lærarar leggja dent á, eru undirvísingaruppgávurnar, og ikki "karriera" í vanligum týdningi. Sjálvsagt spælir her inn, at leiðslustørvini í skúla verkinum eru fá, og møguliga eisini, at leiðslustørv í skúlaverkinum kanska ikki eru so lokkandi[5].

## Tað er samsvar millum tað góða arbeiðið og núverandi arbeiði




Sp.: Heldur tú, at tað er samsvar millum arbeiðið, sum tú hevur nú, og "tað góða arbeiðið", sum tú hugsaði um í svarinum omanfyri?

Áhugavert er eisini, at 69 % av øllum lærarum halda, at tað antin í ávísan ella í stóran mun er samsvar millum teirra núverandi arbeiði og tað, sum teir sjálvir hava lýst sum "tað góða arbeiði". Eisini hetta bendir á, at nógvir lærarar hava eitt nøktandi starv.

[5] Hinvegin so eigur tað at vera viðmerkt, at teir skúlastjórar og varaskúlastjórar, sum hava svarað spurnarblaðnum sum heild trívast betur enn hinir starvsbólkarnir. Tað er nevnliga eingin av hesum sum siga seg í minni mun ella als ikki at trívast. Harafturímóti siga allir seg trívast í stóran ella ávísan mun.

### *2.1.2. Arbeiðstíð og -viðurskifti*

Á myndini høgrumegin sæst, at stórur munur er á, hvussu nógvar flokkar ymsu lærararnar hava. Nakrir lærarar hava einans ein flokk, meðan aðrir hava heilt upp í 9 flokkar. Flestu lærarar (76 %) hava millum 2 og 5 flokkar. Eitt sindur fleiri enn tveir triðingar halda seg undirvísa einum hóskandi tali av flokkum, meðan 16 % halda seg hava ov nógvar flokkar.

Tað er eisini stórur munur á hvussu nógvar lærugreinir lærarar undirvísa í. Meðan 11 % undirvísa í 1 ella 2 lærugreinum so eru tað eisini 11 % sum undirvísa í 7 ella fleiri lærugreinum. Flestu lærarar (79 %) undirvísa í trimum til seks lærugreinum. 78 % av teimum sum hava svarað halda at seg undirvísa í einum hóskandi talið av lærugreinum, meðan 19 % halda seg hava ov fáar lærugreinir.

Viðvíkjandi hvussu nógva tíð lærarar nýta til fyrireiking er eisini stórur munur á. Um um 10 % nýta minni enn 5 tímar. Harafturímóti eru eisini lærarar, sum brúka fleiri enn 20 tímar. Um 80 % brúka vanliga millum 5 og 15 tímar til fyrireiking

**Flestu lærarir hava 2 til 5 flokkar**




Sp.: Hvussu nógvum ymiskum flokkum undirvísur tú?

**…og undirvísa í 3-6 lærugreinum**




Sp.: Í hvussu nógvum ymiskum læ rugreinum undirvísur tú?

**…og nýta vanliga millum 5 og 15 tímar í fyrireiking**




Sp.: Hvussu nógvar tímar um vikuna nýtir tú vanliga til fyrireiking?

Tað eru nógv sum halda, at lærararastarvið krevur ov nógv arbeiði. Heili 31 % halda at tað krevur alt ov nógv arbeiði. Umframt hetta halda 32 % arbeiðs'mongdina' vera eitt sindur ov stóra í mun til arbeiðstíðina. Sostatt eru tað næstan tveir triðingar, ið halda, at lærarastarvið er ov arbeiðstyngjandi í mun til løntu arbeiðstíðina.

Havandi í huga, at tað eru nógv, sum halda arbeiðs'mongdina' vera ov stóra í mun til løntu arbeiðstíðina er tað ikki løgið, at nógv kundu hugsa sær at farið niður í arbeiðstíð. Meðan 58 % halda verandi arbeiðstíð vera nøktandi, so eru tað 34 %, sum kundu hugsað sær at farið niður í arbeiðstíð. Ikki óvæntað eru tað í ein ávísan mun fleiri kvinnur, sum kundu hugsa sær at farið niður í arbeiðstíð.

Tað eru 5 %, sum siga, at tey gjarna vildu arbeitt meira. Hetta eru fyrst og fremst menn. Kanningin gevur ikki nakra beinleiðis forkláring uppá, hví fólk vilja arbeiða meira, men onkur hevur í skrivligu viðmerkingum gjørt vart við at tað átti verið betri møguleikar at arbeitt meira og sostatt fingið eina hægri inntøku.

**Arbeiðsmongdin ov stór í mun til løntu arbeiðstíðina**




Sp.: Hvussu metir tú samsvarið millum arbeiðsmongdina og løntu arbeiðstíðina?

**Ein triðingur kundi hugsað sær at fari niður í arbeiðstíð**




Sp.: Arbeiðstíðin: Kundi tú hugsað tær?

### *2.1.3. Skrivligu viðmerkingarnar*

Nógvar av skrivligu viðmerkingunum viðgera meiri yvirskipaðu trupulleikarnar í lærarastarvinum. Í hesum viðmerkingunum hava fleiri grundgivið fyri, hvat tað er, sum tey halda ger arbeiðið strævið, og tey útdýpa á mangan hátt viðurskiftini, sum eru viðgjørd frammanfyri.

Viðurskiftini, serliga víst verður á eru, at lærarastarvið krevur so nógv ymiskt:

*"Lærarayrkið er krevjandi (ov krevjandi). Tú skalt vera lærari, sálarlækni, sosialráðgevi……… Arbeiðsbyrðan er tískil alt ov stór. Yrkið er tó eisini spennandi og læruríkt, har eg sum lærari kan seta mín persónliga dám á undirvísingina. Økta arbeiðsbyrðan ger tó, at eg ikki havi tað sálarliga yvirskotið til at røkta mína uppgávu/skyldu Hetta er ó-*

*heppið, tí eg meti annars, at eg havi nógv at geva í mínum yrki. Eg merki týðuliga, at eg (og fleiri við mær) eru strongd, hóast samstarvið við næmingarnar og foreldur er fínt. Alt hetta ger, at eg ikki trívist á mínum arbeiðsplássi/yrki. Tískil havi eg tikið ta keðiligu avgerð, at eg verði hægst eitt ár afturat í yrkinum"* (Kvinna, yngri enn 30 ár).

*"Eg haldi, at tað er trupult, at tað verða lagdar meir og meir uppgávur á lærararnar, og lønin er tann sama! Toymisfundir, ráðleggingarfundir, foreldraviðtalur o.s.frv. … Nógvir eykatímar (arbeiðstímar) og ikki eitt oyra afturfyri. Tað er kanska tápuligt at tosa um pengar, men í einum og hvørjum starvi/arbeiðsplássi hevði lønin vaksið samsvarandi!! Eg vænti ikki at vera drúgvur í lærarastarvinum, sjálvt um eg eru útbúgvin til hetta"* (Maður, yngri enn 30 ár).

Seinna sitatið vísir eisini á lønina sum ein trupulleika í mun til ta arbeiðsorkuna, ið krevst. Hetta gerst enn týðuligari í fylgjandi viðmerkingum:

*"Lønin er láturlig, ja eg vil siga flóvislig í mun til arbeiðsorkuna, ið krevst av einum lærara í dag!"* (Maður, 50-54 ár).

*"Lønin er alt ov lág. Færri menn verða lærarar, tí teir fáa ikki ráð til starvið. Sømdir til lærarar frá arbeiðsgevaranum eru at kalla ongar samanborið við privat størv – hetta skapar ónøgd.* (Maður).

Skal man tulka hesi sitatini, so er tað kombinajsónin av fleiri og strævnari arbeiðsuppgávum, umframt einari løn, ið ikki samsvarar hesa arbeiðsbyrðu, ið fær nøkur at umhugsa at søkja annað arbeiði. Hetta styrkir sostatt ta myndina, ið longu er givin við taltilfarinum omanfyri, og serliga at talan er um ein eina gongd, sum hevur vundið uppá seg seinnu árini.

*"Arbeiðið er alt ov strævið. Lærararbeiðið er eitt undirlønt "stressjob". Tú hevur nógv um at vera: fundir við lærarar, fundir við næmingar, fundir við foreldur, jólahugni við flokki + foreldur, útferðir, og 1000 onnur ting."* (Kvinna, yngri enn 30 ár).

*"Tað gerst strævnari og strævnari so við og við sum fólkaskúlalógin gerst virkin"* (Maður, 55-59 ár).

Hesi bæði seinastu sitatini knýta júst trupulleikarnar hjá lærarunum saman við ein meiri opnan, umbroytiligan og 'krevjandi' skúla[6]. Tó, eisini í skrivligu viðmerkingunum avspeglast eitt samansett bílæt av lærarastarvinum, eitt nú í hesi viðmerkingini:
*"Eg má siga at alt er relativt. At vera lærari er besta arbeiði, eg havi havt. Tá ið man hevur staðið á trolaradekki og bøtt í Eysturgrønlandi í -20° við einari arbeiðsviku á uml.*

[6] Javnmet eisini hesar útsagnir um tær vit høvdu um 'refleksiva samfelagið' og sosialisering í 1. parti.

*100 t, so kanst tú siga, at lærarayrkið er eitt sera gott og fittligt lív, sum eg ikki hevði viljað skift um við.”*

Hetta sitatið vísir, at mangar orsøkir eru fyri, hvussu nøgd fólk eru við teirra starv. Okkara uppgáva víðari verður at greina tey viðurskifti, sum hava serligan týdning fyri tey almennu viðurskifti, sum eru tikin fram í hesum parti.

## 2.2. Samandráttur

Í hesum partinum hava vit viðgjørt almenna úrslitið av spurninginum um, hvussu tað er at vera lærari í føroyska fólkaskúlanum í dag.

Ein almenn niðurstøða er tann, at flestu lærararir trívast væl í teirra starvi (3/4), men at ein stórur minniluti ikki tykist trívast serliga væl (1/4). Tað eru fleiri enn helvtin, sum av álvara hava umhugsað at søkt annað starv. Hetta eru serliga tey, sum siga seg ikki vera nøgd við teirra arbeiði. Hóast bert ein av fleiri orsøkum, so má mistrivnaður greitt takast við sum ein avgerandi faktorur í tí veruleika, at meiri enn helvtin av lærarunum umhugsa, um tey vilja satsa uppá lærarastarvið í framtíðini.

Ein onnur almenn niðurstøða er, at tað greitt eru hendar broytingar í viðurskiftum lærarans seinnu árini, sum gera, at mistrivnaðurin økist. Her tykist serliga ein økt arbeiðsbyrða, eitt størri ’trýst’ frá ymiskum síðum, kombinerað við eini løn, ið ikki verður mett at vera serliga høg, at vera høvuðsorsøkin.

Í triðja lagi kann sigast, at fyri tey flestu er lærarstarvið eitt starv, sum væl uppfyllir treytirnar fyri, hvat hesin samfelagsbólkur metir sum ”tað góða arbeiðið”. Hetta kann tulkast sum at møguleikarnir fyri, at lærarastarvið kann gerast eitt gott starv, eisini fyri tey ið mistrívast, skuldi verið til staðar.

# 3. Innanhýsis viðurskifti lærarans

Í hesum partinum skulu vit greina nærri, hvussu lærarar uppfata, at teirra innanhýsis viðurskifti ávirka teirra støðu sum lærarar í føroyska fólkaskúlanum. Við innanhýsis viðurskifti meinast: viðurskiftini við næmingarnar, við starvsfelagar/leiðslu, umframt fysisku karmarnir, teir hava at virka undir.

## 3.1. Lærarin og næmingarnir

Ein heilt grundleggjandi partur av lærarstarvinum er sambandið við næmingarnar. Uppgávan hjá fólkaskúlanum er at menna ungdómin fakliga og sosialt, soleiðis at bæði einstaklingar og samfelagið sum heild hava fortreytir fyri framhaldandi menning.

> **Endamál fólkaskúlans**
>
> § 2.
> Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini a fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.
>
> Stk. 2.
> Fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúp-hugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunn venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og ti teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.
>
> (Løgtingslóg nr. 125 frá 20.mai 1997 um fólkaskúlan)

Menningin av einstøku næmingunum fer fram í sambandinum millum lærara og næmingar. Hetta sambandið er kjarnan í lærarastarvinum. Í hvønn mun ein lærari klárar sínar uppgávur væl, og hvussu hann harvið trívist í starvinum, er tí í stóran mun tengt hesum sambandi.

Hvussu kenna lærarar so hetta sambandið?

Á myndini niðanfyri sæst, at næstan allir lærarar (91 %) lýsa teirra viðurskifti við næmingarnar sum antin góð ella sera góð. 9 % halda, at viðurskiftini eru nøktandi, meðan eingin lýsir viðurskiftini við næmingarnar sum vánalig. Tað eru bæði kvinnur og menn sum halda, at viðurskiftini sum heild eru góð, men tað er ein tendensur til, at kvinnurnar lýsa viðurskiftini meiri positivt enn menninir.

**Viðurskiftini millum lærarar og næmingar sum heild góð**




Sp.: Hvussu heldur tú, at viðurskiftini, sum heild, eru millum teg og næmingarnar?

**...viðurskiftini sum heild betraði tey seinnu árini**




Sp.: Heldur tú, at viðurskiftini (...) sum heild eru blivin betur ella verri tey seinnu árini?

Umframt, at flestu lærarar lýsa viðurskiftini við næmingarnar sum góð, so eru tað eisini 62 %, sum halda viðurskiftini vera betri í dag, enn fyri nøkrum árum síðani. Um 20 % halda viðurskiftini vera óbroytt, meðan einans 10 % halda, at viðurskiftini við næmingarnar eru blivin verri. Tað tykist at vera stórur munur á, hvat kvinnur og menn halda um hetta, tí meðan 7 % av kvinnunum halda, at viðurskiftini eru versnaði so eru tað 13 % av monnunum.

### *3.1.1. Uppalingarliga uppgávan*

Nógv verður tosað um, at børnini eru broytt. Nútímans meginreglur fyri uppaling føra við sær, at børnini eru ”meiri frí”, tá ið tey eru saman við vaksnum. Børnini krevja eisini grundgevingar fyri, hví tey skulu gera tað, tey vera biðin um. Hetta er eitt ”grundvilkor” í ”refleksiva samfelagnum”, sum lýst í 1. parti. Hesar broytingar nýtast ikki í sjálvum sær at vera til tað verra. Avgerandi er, at hetta broytir læraraleiklutin, og er sostatt ein nýggj avbjóðing í fólkaskúlanum. Hendan avbjóðing avspeglast í nýggju fólkaskúlalógini, har fólkaskúlin skal *”búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfel-*

**Tann uppalandi uppgávan fyllir meiri í dag enn fyrr**




Sp.: Heldur tú, at tann uppalandi uppgávan fyllir meira í lærarastarvinum í dag samanborið við fyrr?

*ag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði*" (Løgtingslóg nr.125 frá 20.mai 1997 um fólkaskúlan).

Tað er sera stór semja millum lærarar um, at tað vit hava kallað "uppalandi uppgávan" fyllir meira í lærarastarvinum enn hon hevur gjørt. Sum vit síggja á myndini, so halda út-við 95 %, at uppalandi uppgávan fyllir meira. Eisini her eru stórir kynsligir munir á, hvussu hesi viðurskifti verða uppfataði. Tað eru nevniliga munandi fleiri kvinnuligir lærarar, ið halda at uppalingarliga uppgávan fyllir munandi meira í dag samanborið við fyrr.

Eftir teimum skrivligu viðmerkingunum at døma, kann hetta vera rættiliga ørkymlandi fyri læraran. Ein lærari sigur m.a. at "*uppalingarsíðan **drenar teg fyri orku**. Tú átekur tær heimligu uppgávurnar sum lærari*." (Kvinna, 40-44 ár).

Uppalandi uppgávurnar verða eisini lýstar sum ein trupulleiki, tí "*tann uppalandi uppgávan fyllir alt ov nógv í mun til ta fakligu uppgávuna.*" (Kvinna, 45-49 ár).

Ein annar lærari lýsir trupulleikan soleiðis: "*Ov stórar byrðar [verða] lagdar á herðarnar á okkum. Ov lítil tíð til undirvísing. Alt møguligt verður kroyst inn í skúlan, sum vit skulu taka okkum av. Alt ov nógvir sosialir trupulleikar, ið vit ikki altíð eru før fyri at loysa. Alt ov lítla hjálp/stuðul, har veruligir trupulleikar eru. Lærarar koyrdir niður, tí einki fær nakrar avleiðingar. Truplir næmingar eru vinnarar ferð eftir ferð….*" (Kvinna, 45-49 ár).

Og ein triði sigur: "*Til tíðir er nógvur gangur, og tað kennist, sum børnini súgva alla orkuna úr einum. Ofta kennist tað, sum vit meira eru uppalarar og skulu læra børnni, hvussu mann skal vera saman við øðrum menniskjum, enn lærarar. Eg føli ofta, at pláss ikki er fyri tí fakliga, tí hitt fyllir so nógv, ofta sovorðið, sum skuldi verið natúrligt, sum børnini skuldu fingið heimanfrá. Ofta kundi eg hugsa mær at sett smør upp á hyllar í staðin.*" (Kvinna, yngri enn 30 ár).

Hetta gongur í stóran mun út yvir friðin at undirvísa: "*Sjálvt niður í teir smáu flokkarnar fáast ikki at tiga og lurta eftir. Frægari er tó tá teir fáa skrivligar uppgávur at loysa Tað er ógvuliga krevjandi at vera lærari í dag, við tað at virðingin er ikki tað sama fyri tær sum lærari. Í summum førum er talan um óskil. Skúlin er ikki altíð eitt trygt stað hjá lærarum og næmingum*." (Maður, 45-49 ár).

Hesar viðmerkingar geva greiðar ábendingar um, at uppalandi leiklutur lærarans ger tað trupult at røkja aðrar uppgávur, eitt nú undirvísingina. Sammett við positivu niðurstøðurnar í parti 2.2, har flestu lærarar almennt sæð lýstu teirra viðurskifti við næmingarnar sum góð, kann heldur negativa lýsingin her av uppalandi uppgávuni tykjast vera ein andsøgn.

Talan er um ein trupulleika, sum tykist vinda uppá seg, men sum enn ikki eru á einum slíkum støði, at tað hevur oyðilagt viðurskiftini millum lærarar og næmingar. Undir øllum umstøðum er talan um eina keldu til ørkymlan, tí tíðin og umstøðurnar at læra frá sær tað, ið lógin og lesiætlanir siga, gerst minni. Her er greitt ein trupulleiki, ið eigur at vera tikin í álvara frá bæði skúlans og mynduleika síðu, soleiðis at hann ikki sleppur at menna seg til ein óloysiligan trupulleika. Í komandi pørtum skulu vit greina nærri tey ”formellu” og ”óformellu” viðurskiftini millum lærara og næming.

### *3.1.2. Næmingalagað undirvísing*

Ein av meginreglunum í nýggju fólkaskúlalógini er, at undirvísingin skal vera næmingalagað (sí boks). Hetta merkir, at undirvísingin skal taka støði í tí einstaka næminginum og hansara fortreytum og menningarstigi, og skal miða eftir, hvat tann einstaki næmingurin kann náa.

**Ásetingin um at undirvísingin skal vera næmingalagað er ásett í § 2, 1.stk., § 21, 1. og 4 stk. í fólkaskúlalógini**

§ 2.
Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini a fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

§ 21.
Ráðleggingin av undirvísingini, herímillum valið av undirvísingar- og arbeiðsformum, háttum, undirvísingar-miðlum og evnum, skal megna tað, sum ásett er í endamálsgrein fólkaskúlans, og vera lagað til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum.

Stk. 4.
Á hvørjum floksstigi og í hvørji lærugrein samarbeiða lærarar og næmingur javnan um at ás tey mál, roynt verður at náa. Arbeiði næmingsins verður lagt til rættis við atliti at hesu málum. Ásetingin av arbeiðsformum, -háttum og evnisvali skal í mestan mun fara fram í samstarvi millum lærararnar og næmingarnar.

Við meginregluni um næmingalagaða undirvísing hava lærarar fingið eina nýggja uppgávu, sum er: ”*støðugt at gera fakligar og pedagogiskar metingar av undirvísingargongdini hjá tí einstaka næminginum og flokkinum sum heild, broyta og tillaga undirvísingarinnihaldið og royna nýggjar undirvísingarhættir*.” (Fólkaskúlalógin – ein avbjóðing, 2001, s. 20).

Næmingar eru sera ymiskir, tá tað snýr seg um teirra fakliga førleika. Tað kunnu vera næmingar, sum t.d. klára at rokna eina uppgávu uppá fáar minuttir, meðan aðrir næmingar als ikki klára at gera hesa somu uppgávu. Fyri læraran merkir hetta, at tann næmingurin, sum heldur uppgávuna vera lætta, má fáa nýggjar og størri avbjóðingar, meðan næming-

urin, sum heldur tað vera trupult, má fáa eina hjálpandi hond. Hvat halda lærarar um meginregluna um næmingalagaða undirvísing?Og halda teir seg klára hesa avbjóðingina?

Í myndini niðanfyri sæst, at ein stórur meiriluti – um 80 % av teimum, ið svaraðu spurnarblaðnum – tekur undir við meginregluni um næmingalagaða undirvísing. Harafturímóti eru tað bert millum 3 og 4 %, sum undir ongum umstøðum taka undir við hesum, meðan um 10 % einans í minni mun taka undir við meginregluni um næmingalagaða undirvísing.

**Lærarar taka undir við meginregluni um næmingalagaða undirvísing**




Sp.: Í hvønn mun tekur tú undir við meginregluni í fólkaskúlalógini um næmingalagaða undirvísing?

Eitt er at taka undir við meginregluni. Eitt annað er kenna seg føran fyri at fremja næmingalagaða undirvísing í verki. Á myndini høgrumegin sæst, at 47 % siga, at tey einans í minni mun ella als ikki kenna seg før fyri at fremja næmingalagaða undirvísing í verki. Av hesum eru tað um 6 %, sum siga seg í ongan mun kenna seg føran fyri fremja næmingalagaða undirvísing. Hesi úrslitini vísa greitt, at tað eru nógv, sum tykjast rættiliga í iva um, hvussu hendan meginreglan kann setast í verk í teirra dagliga arbeiði. Hetta sæst eisini aftur í teimum skrivligu viðmerkingunum.

**Trupult at fremja næmingalagaða undirvísing**




Sp.: Í hvønn mun kennir tú teg føran fyri at fremja næmingalagaða undirvísing í tínum arbeiði?

Nøkur viðmerkja, at tað kann vera ringt at skilja, hvussu meginreglan skal skiljast:

*"Eg haldi, at hugtakið er ov hágfloygt til mín gerandisdag."* (Kvinna, 50-54 ár).

*"Hvat merkir hetta [næmingalagað undirvísing] nágreiniliga?"*(Maður, 55–59 ár).

Onnur leggja dent á, at tað er ringt at fremja næmingalagaða undirvísing, tí tað eru ov nógvir næmingar og ov lítil tíð: *„Haldi ikki, at hon [meginreglan í fólkaskúlalógini um næmingalagaða undirvísing] kann praktiserast við 24 næmingum."*(Maður, 50–54 ár).

*"Tað er torført at geva nøktandi næmingalagaða undirvísing, har neyðugt er við samanløgdum flokkum í næstan øllum lærugreinum. Næmingatalið í 1., 2. og 3. flokki átti ikki at vera meiri enn 18."* (Kvinna, 55-59 ár).

*„Vit hava ikki (roynt) annað síðani ein byrjaði sum lærari … men tíðin strekkir ikki til (ov fáir tímar)."* (Kvinna, 45–49 ár).

Men tað eru ikki øll, sum eru so ivasom viðvíkjandi teirra hegni og møguleika at fremja næmingalagaða undirvísing. Heili 45 % halda seg í ávísan mun vera før fyri hesum, og 5 % siga seg í stóran mun vera før fyri at fremja næmingalagaða undivísing. Bert lítil munur er á, hvussu kvinnur og menn uppliva hesi viðurskifti.

Grundleggjandi kunnu tvær orsøkir vera til, at fólk uppfata teirra førleika á hesum øki so ymiskt. Ein orsøk kann vera, at teirra hegni veruliga er ymiskt. Ein onnur orsøk kann vera, at fólk skilja hetta kravið á hvør sín máta, ella ymiskt millum skúlar, og hava tí ymisk krøv til teirra egna leiklut.

Í einum nýliga almannakunngjørdum áliti um nýggju fólkaskúlalógina *Fólkaskúlalógin – ein avbjóðing*, skriva limirnir í arbeiðsbólkinum:

*"Við verandi skipan í fólkaskúlanum, at ein lærari skal undirvísa 24 næmingum, og at allir næmingar, uttan mun til mentalan og fysiskan førleika, skulu taka lut í undirvísingini,* ***er ikki gjørligt at fullføra næmingalagaða undirvísing****. Henda undirvísingarliga meginregla, sum skuldi verið aðalmálið eftir nýggju fólkaskúlalógini og givið hvørjum einstøkum næmingi teir bestu møguleikar at læra og eina viðkomandi undirvísing,* ***verður bert eitt eiti****, um samsvar ikki er ímillum lærara- og næmingatímar, og um serliga skipanir fyri veikar og menningartarnaðar næmingar verða ikki settar í verk".* (Fólkaskúlalógin - ein avbjóðing, 2001, s. 12-13).

Úrslitið av hesum parti av spurnarkanningini stuðlar partvís undir hendan boðskapin í nevnda áliti.

### *3.1.3. Ráðlegging, toymi, fundir o.a.*

Seinnu árini eru fleiri krøv sett til lærararnar um, at teir skulu gera formfestar ætlanir fyri arbeiði teirra, eins og tað er eitt krav, at lærarar skulu samstarva meiri. Grundgevingin fyri hesum er, at fyri at náa málunum um næmingalagaða undirvísing, krevst ráðlegging og fyrireiking av undirvísingini. Tað er ikki nóg mikið, at hvør lærari í sínum lagi leggur undirvísingina til rættis, men at tættsamstarv er ímillum lærararnar, ið undirvísa í einstaka flokkinum og á sama floksstigi (Fólkaskúlalógin - ein avbjóðing, 2001, s.13).

Ein partur av øktu krøvunum um ráðlegging er, at lærarar skulu lata inn skrivliga ráðlegging í øllum lærugreinum. Hesar fakligu ársætlanir skulu innihalda: aðalmál, ítøkilig mál við tíðaráseting, eina lýsing av, hvat tilfar ætlanin er at brúka og serlig hugskot/serlig tiltøk.

Tað krevur nógv arbeiði at gera hesar ársætlanir, og alt hetta arbeiði skal gerast fyrst í skúlaárinum. Hvat halda lærarar um hetta? Síggja teir ársætlanirnar sum nakað positivt, har teir fáa lagt undirvísingargongdina til rættis, og sum sostatt kemur teimum til góðar seinni? Ella síggja teir ársætlanirnar sum eitt óneyðugt inntriv og eyka arbeiðsbyrðu, sum eisini skapar ótta fyri øktum eftirliti?

**Flestu lærarar hava latið inn skrivligar ráðleggingar**




Sp.: Hevur tú í ár latið inn skrivligar ársætlanir (ráðleggingar) fyri flokkarnar hjá tær?

**Ymiskar meiningar um skrivligu ráðleggingarnar**




Sp.: Hvat heldur tú um, at lærarar skulu lata inn skrivligar ráðleggingar?

Myndin omanfyri vísir, at næstan 9 út av 10 lærarum hava latið inn skrivligar ársætlanir fyri flokkarnar hjá sær hetta skúlaárið. 59 % av teimum siga seg vera samd í, at ársætlanirnar eru góðar, tí tær gera, at tey mugu taka støðu til nógv ymisk viðurskifti og at hetta kemur teimum til góðar seinni. Tað er tó eingin beinleiðis semja um hetta. Næstan ein triðingur heldur, at ársætlanirnar eru óneyðugar og ein forargilig arbeiðsbyrða. Tað mest undrunnarverda er tó, at so avgerandi kynsligir munir eru á, hvat hildið verður um skrivliga ráðlegging. Einans helvtin av monnunum halda tað vera gott, at so er, meðan nærum

70 % av kvinnunum halda tað sama. Meðan 42 % av monnunum halda, at ársætlanir eru óneyðugar, so eru tað "einans" 23 % av kvinnunum, ið halda tað sama.

### *3.1.4. Samrøður við leiðsluna*

Í fólkaskúlalógini verður sligið fast, at skúlaleiðarin "*skal tryggja, at flokslærarin og aðrir lærarar floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina, so at allir næmingar kunnu fáa sínar avbjóðingar*" (§21 stk.2 í fólkaskúlalógini). Í fleiri skúlum verður í sambandi við tær skrivligu ársætlanirnar skipað fyri einari munnligari samrøðu millum einstaka læraran og skúlastjóran ella varaskúlastjóran. Har verður tosað um ársætlanirnar og um, hvussu tað gongur at arbeiða eftir teimum.

Eitt sindur fleiri enn helvtin av teimum, ið svaraðu spurnarblaðnum, siga, at tað verður skipað fyri tílíkum samrøðum á skúlanum, har tey arbeiða. Hvat halda lærarar um hetta? Er tað nakað, sum teir halda vera eitt gott tilboð um fakligt samspæl, sum kann vera ein liður í persónligari og fakligari menning? Ella verður tað sæð sum eitt inntriv í teirra arbeiði, og kenna teir ein ótta fyri øktum eftirliti?

**Har samrøður eru millum leiðslu og lærarar um ársætlaninr, verð tær sum heild mettar sum eitt gott tiltak**




Sp.: Um ja, hvussu uppfatar tú hesar samrøður?(tú kanst seta fleiri krossar)

Sum vit síggja á myndini[7] omanfyri, so halda 60 % av teimum, sum arbeiða á einum skúla har tílíkar samrøður fara fram, at hesar samrøður eru positivar. 13 %, halda, at tær eru eitt óneyðugt inntriv í gerandisdagin. 28 % halda, at samrøðurnar økja um eftirlitið, sum leiðslan hevur við lærarunum.

[7] Legg til merkis, at tey, ið svaraðu, kundu seta fleiri krossar, og tí geva prosentini ikki 100 %, um tey verða løgd saman.

### *3.1.5. Ráðleggingartoymi*

Til tess at skipa undirvísingina betri og fyri at betra um møguleikarnar at fáa meginregluna um næmingarlagaða undirvísing setta í verk, fer partur av arbeiðnum í føroyska skúlunum fram í ráðleggingartoymum.

Um 85 % av teimum, sum hava svarað spurnarblaðnum, eru við í einum ella fleiri ráðleggingartoymum. Hesi toymini eru ein nýskapan í føroyska skúlaverkinum. Flokslærarin hevur høvuðsábyrgdina av arbeiðinum, sum verður gjørt í einum toymi. Limirnir í toyminum eru oftast flokslærarin, sum er formaður og skrivari, ein høvuðslærari og ein annar lærari, sum aloftast hevur nógvar tímar í flokkinum

**Ymiskt hvussu ofta fundur er í ráðleggingartoymunum**




Sp.: Hvussu ofta hava tit fund í ráðleggingartoymunum?

Á myndini sæst, at tað eru rættiliga stórir munir á, hvussu oftani fundir verða hildnir í ymsu toymunum. Tveir triðingar hava fund í ráðleggingartoyminum meira enn eina ferð um mánaðin, meðan meiri enn 20 % siga, at tey sjáldan hava fund.

**Toymini stimbra fakliga kjakið**




Sp.: Í hvønn mun stimbrar arbeiðið í toymið tað fakliga kjakið?

Á myndini niðanfyri sæst, í hvønn mun lærarar halda at arbeiðið í toymi stimbrar fakliga kjaki.

Í undirvísingarstøðuni er lærarastarvið eitt rættiliga einsligt starv. Tí kann tað hugsast, at eitt formfest stað kann vera ein hjálp hjá tí einstaka læraranum at fáa íblástur til, hvussu viðkomandi kann handfara ymisk viðurskifti. Tað tykist eisini sum um nógv halda, at tað helst er soleiðis. Umleið tveir triðingar halda, at arbeiðið sum fer fram í toymunum, stimbrar fakliga kjakið. Tað eru heldur fleiri kvinnur, sum halda hetta.

Út við 30 % halda, at toymini einans í minni ella ongan mun stimbra fakliga kjakið. Onkur hevur t.d. viðmerkt, at *"Ráðlegging er alt ov ofta ráðlegging um sjálvssøgd ting."* (Maður, 45-49 ár). Og ein annar sigur *"…og so hesir …. ráðleggingarfundirnir, sum í*

*roynd og veru einki endamál hava fyri undirvísingina - sum oftast langar talur við ongum innihaldi…”* (Maður, 55-59 ár).

At alsamt fleiri fundir verða skipaðir í skúlunum er ein sannroynd, og ikki øll eru so fegin um hetta. Væl meiri enn 40 % halda, at ov nógv tíð verður nýtt til fundarvirksemi o.l. Av hesum eru 20 %, sum siga, at tíðarnýtslan er ”alt ov umfatandi”. Aftur her er týdningarmikið at leggja til merkis, at stórur munur er á, hvat kvinnur og menn halda um hendan spurningin. Tað eru nevnliga munandi fleiri menn sum halda, at ov nógv tíð verður brúkt til fundarvirksemi.

**Nógv halda, at ov nógv tíð verður brúkt til fundarvirksemi**




Sp.: Hvat heldur tú um tíðina, sum verður brúkt til fundarvirksemi o.l. á tínum skúla?

Fleiri av teimum, ið hava svarað spurnarblaðnum, hava í teirra skrivligu viðmerkingum givið til kennar, hví tey ikki eru so fegin um tíðina, ið verður brúkt til fundarvirksemi. Felags fyri fleiri av hesum er, at tey eru ónøgd við, at ov lítil tíð verður til at undirvísa, sum eisini sæst í endurgevingunum niðanfyri.

*”Tað fer alt ov nógv orka til fjas og fundarvirksemi, heldur enn at nýta hana til at undirvísa og læra næmingarnar nakað”.* (Maður, 55-59 ár).

*”Sjálvt tað at undirvísa er næstan tann minsti parturin av arbeiðnum. Man kvalist av øllum fundunum.”.*(Kvinna, yngri enn 30 ár).

*”Tað fer alt ov nógv tíð og orka til fundarvirksemi, sum ikki kemur næmingunum til góðar…”* (Maður, 55-59 ár).

*"Fundarvirksemið (í 30 ár). Fyrr var bert onkur fundur. Nú er fundur hvørja viku (ofta fleiri). Sosialu trupulleikarnir fara við nógvari tíð – fyrr fóru flestu slíkir næmingar úr skúlanum og til skips. At avtaka lærararáðið var eitt stórt "mistak". Skúlin er vorðin minni demokratiskur, meðan endamálið við lógini er meira demokrati – til foreldrini og næmingarnir?!*" (Maður, 50-54 ár).

### *3.1.6. Viðurskiftini í flokkinum*

Omanfyri varð víst á, at allarflestu lærarar lýsa viðurskiftini við børnini sum góð. Hinvegin varð eisini víst á, at nógvir lærarar hildu tað vera trupult at fremja næmingalagaða undirvísing.

Mesta undirvísingin fer fram í flokkum. Hvussu uppliva lærarar viðurskiftini í flokkunum? Vit hava sæð, at lærarar í stóran mun eru samdir um, at tann uppalandi uppgávan fyllir meir í skúlanum nú í mun til fyrr. Merkir hetta, at ófriðurin er so umfatandi, at tað spillir møguleikarnar at undirvísa?

Myndini niðanfyri vísir hvussu lærarar hava svarað uppá ymsar spurningar, um hvussu viðurskiftini eru í flokkunum[8].

[8] *Viðmerking. Fleiri gjørdu gjørdu í teirra skrivligu viðmerkingum vart við, at tað var eitt sindur ringt at svara hesum spurningunum, tí stórur munur var á viðurskiftunum í ymsu flokkunum. T.d. segði ein. at "[t]að er torført at svara 59, tí eg havi ymisk svar til ymiskar flokkar. P.S. svarið til 59 hóskar til annan flokkin eg havi – ikki hin!!"(Kvinna, 45-49 ár). Eitt annað dømi:"Spurningur 59 er torførur at svara, tí tað er sera ymiskt frá flokki til flokk, hvussu hesi viðurskiftini eru." (Kvinna, 35-39 ár)*

**Viðurskifti í flokkinum**




Fyrsti spurningur viðgerð møguleikarnar at gjøgnumføra ætlaðu undirvísingina, og heili 83 % halda, at møguleikarnir fyri hesum eru nøktandi, góðir ella sera góðir. Hetta kann eisini síggjast sum ein undirstriking av, at flestu lærarar hava tað gott saman við næmingunum, eins og víst hevur verið omanfyri.

Næsti spurningurin vísir eisini greitt gongdina, peikað varð á omanfyri, at verri er tá talan er um næmingalagaðu undirvísingina. 53 % siga, at møguleikarnir at hjálpa øllum næmingunum eru vánaligir ella sera vánaligar. Triði spurningurin er um, hvussu møguleikarnir at hjálpa tí einstaka næminginum er. Her halda heili 70 %, at hesir møguleikar beinleiðis eru vánaligir, meðan einans 32 % halda, at teir eru nøktandi ella góðir. Samanlagt er hetta ein undirstriking av, at nógvir lærarar halda, at tað er trupult at liva upp til meginregluna um næmingalagaða undirvísing. Tað er væl hugsandi, at hetta kann vera ein kelda til ta frustrasjón, sum áður er víst á.

Stór semja er millum lærarar um, at uppalandi uppgávan fyllir meir í lærarastarvinum. Hóast hetta, so siga 65 %, at møguleikarnir at stýra atferðini hjá næmingum eru antin nøktandi ella góðir. 65 % siga eisini, møguleikarnar at loysa sosialar trupulleikar og ósemjur í flokkinum vera góðar ella nøktandi. Hinvegin so eru góð 30 %, sum halda møguleikarnir fyri hesum eru vánaligir[9].

[9] Í samband við hendan spurningin skal tað viðmerkjast at nakað færri hava svarað hesum spurninginum samanborið við hinar. Ein orsøk til hetta kann vera at nøkur halda at tað ikki er uppgávan hjá lærarum ”at stýra” atferðina hjá næmingunum.

### *3.1.7. Luttøkan hjá næmingunum*

Myndin niðanfyri vísir, at flestu lærarar meina, at næmingarnir sum heild eru virknir, fylgja væl við og gera soleiðis, sum lærarin sigur. Tó er ein partur, sum heldur, at tað einans eru nakrir ella fáir, sum luttaka aktivt í skúlagongdini.

Næstan allir lærarar halda, at tað eru onkrir næmingar, sum eru ófriðaligir og hava ikki bindindi inni í flokkinum.

**Luttøkan hjá næmingunum**




Sp. Lýsing av viðurskiftunum í flokkinum

Tað eru helst fleiri orsøkir til, at næmingar ikki luttaka í undirvísingini, soleiðis sum framgongur av hesum viðmerkingunum.

*"Teir næmingar, sum ikki eru virknir, eru í størsta mun teir, sum eru "lidnir", tí teir duga so væl. Júst henda støða gevur mær stress, tí eg fái sera ringa samvitsku av altíð at muga biða teir næmingarnar "bíða". Eg megni ikki at laga undirvísingina eftir øllum næmingunum, hví skulu teir "góðu" so altíð sita við sviðusoð, mær hóvaði betri, um tað hevði loyst seg at dugað, tí so kanska næmingarnir høvdu fingið hug. Tað "virkar sum um" at tey flestu eru nøgd um vit "næmingalaga undirvísingina" eftir teimum veiku og miðjuni, "teir sterku skulu nokk klára seg alíkavæl". Tað passar bara ikki, tí teir sterku kunnu saktans hava tørv á onkrum øðrum enn les/skr., og tað meti eg verður forsømt. Arbeiðsplássið loyvir ikki at hjálpa teimum eisini."* (Kvinna, 30-34 ár).

*"Eitt eyðkenni í dag er, at næmingarnir eru hugaðir at gera eitt arbeiði, tá teir sjálvir avgera evnið, t.d. verkætlanararbeiði, men trupult er at fáateir at gera rutinuarbeiði sum til dømis støddfrøði uppgávur. Teir eru meiri sjálvstøðugir og krevjandi, tá áhugin er har. Hetta ger arbeiði hugaligt. Sjálvstøðugheitin hevur eisini eina negativa síðu, sum ger*

*arbeiði ósamanhangandi hjá læraranum, tí alt fleiri gera ikki sína skyldu.*“ (Maður, 55-59 ár).

## 3.2. Lærarin og starvsfelagar

Umframt næmingarnar, eru tað ein røð av øðrum innanhýsis viðurskiftum, sum hava týdning fyri menningina av skúlanum. Talvan niðanfyri gevur svar uppá, hvussu lærarar síggja síni viðurskifti við starvsfelagar og leiðslu, sítt fakliga umhvørvi, ósemjur eins og fysisku karmarnar. Samanlagt geva svørini eina rættiliga fjølbroytta mynd av, hvussu lærarar hava tað í sínum nærumhvørvi. Sum heild ber til at siga, at nógvir lærarar hava eina rímiliga positiva mynd av teirra arbeiðsplássi.

| | Í stóran mun | Í ávísan mun | Í minni mun | Als ikki | Veit ikki | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólk eru opin fyri uppskotum og nýggjum tiltø kum | 14 % | 55 % | 26 % | 5 % | 1 % | 304 |
| Fólk stuðlað hvø rjum ø ðrum og loysa trupulleikarnir í felag | 14 % | 49 % | 26 % | 11 % | 1 % | 306 |
| Hvø r passar sítt | 23 % | 42 % | 28 % | 7 % | 1 % | 300 |
| Tað eru nógvar óloystar ósemjur | 15 % | 24 % | 38 % | 18 % | 5 % | 304 |
| Umhvø rvið er fakliga kveikjandi og spennandi | 6 % | 39 % | 35 % | 19 % | 2 % | 303 |
| Gott kollegialt umhvø rvið | 34 % | 45 % | 15 % | 6 % | 1 % | 305 |
| Góð viðurskifti millum leiðslu og læ rarar | 30 % | 44 % | 15 % | 10 % | 1 % | 305 |
| Eitt gott og vinarligt umhvø rvið | 36 % | 46 % | 12 % | 6 % | 0 % | 303 |
| Eitt strongjandi umhvø rvið | 16 % | 30 % | 30 % | 24 % | 1 % | 299 |
| Ein kø vandi stemningur | 9 % | 14 % | 20 % | 55 % | 1 % | 300 |
| Umhvø rvið ereyðkent av stagnation | 12 % | 28 % | 22 % | 34 % | 4 % | 299 |
| Teir fysisku karmarnir eru nø ktandi | 8 % | 27 % | 21 % | 44 % | 0 % | 304 |

**Lýsing av skúlanum og arbeiðsumhvørvinum, har tú arbeiðir**

Í lýsingunum niðanfyri skulu úrslitini í hesi talvuni stutt greinast.

### *3.2.1. Starvsfelagar*

Ein stórur meiriluti (75 %) lýsa teirra skúla at hava eitt gott kollegialt umhvørvi, umframt, at heili 80 % halda, at skúlin er eitt gott og vinarligt umhvørvi. Harafturat halda fleiri enn 60 %, at fólk stuðla hvørjum øðrum og loysa trupulleikarnar í felag. Sum lýst í broti 2.1.1, leggja lærarar størsta dentin á dámligar starvsfelagar, tá ið teir skulu lýsa ”tað góða arbeiði”. Úrslitini frá hesum spurningum benda greitt á, at tað at vera lærari í føroyska fólkaskúlanum á mangan hátt livir upp til teir forvæntningar, sum eru um ”tað góða arbeiðið”.

### 3.2.2. Ósemjur

Hóast tey flestu lýsa viðurskiftini millum seg og starvsfelagarnar sum góð, so eru tað 39 %, ið halda, at tað eru nógvar óloystar ósemjur á teirra arbeiðsplássi, meðan 56 % ikki halda hetta vera nakran trupulleika.

At umleið 4 út av 10 halda, at tað eru nógvar óloystar ósemjur, má sigast at vera eitt rættiliga høgt tal, og má hetta metast at vera nakað, sum er við til at minka um trivnaðin. Í spurnarblaðnum bleiv eisini spurt, um lærararnir hildu, at tað høvdu verið fleiri ella færri ósemjur á teirra arbeiðsplássi. Ein góður triðingur helt, at fleiri ósemjur hava verið. Restin helt, at støðan antin er óbroytt, ella at tað ikki hava verið ósemjur av týdningi

**Ikki nógvar ósemjur**




Sp.: Heldur tú, at tað tey seinnu árini hava verið fleiri ella fæ rri ósemjur á tínum arbeiðsplássi?

Harafturat blivu fólk spurd, hvørjar orsøkir tey hildu vera til, at ósemjur høvdu verið.

**Har ósemjur hava verið, er leiðslustílurin ein av høvuðsorsøkunum**




Sp.: Um ósemjur hava verið, hvørja heldur tú so orsøkina vera? (tú kanst seta fleiri krossar)

Sum vit síggja, so halda nógv, at leiðslustílurin er ein orsøk til ósemjur. Arbeiðsmongd og arbeiðsstrongd vera eisini nevndar sum meginorsøkir til ósemjur, umframt at nógv halda, at ov nógvar broytingar í senn er nakað, sum hevur havt ósemjur við sær. Av skrivligu viðmerkingunum framgongur serliga, at tær mongu broytingarnar, sum koma inn í skúlarnar, í stóran mun eru orsøkin til frustrasjónir.

### *3.2.3. Leiðslan*

Hóast fleiri siga, at leiðslustílurin er orsøkin til ósemjur, so sýnist tað ikki sum viðurskiftini millum lærarar og leiðslurnar sum heild eru vánalig. Fleiri enn 70 % av øllum lærarum meina, at viðurskiftini millum leiðslu og lærarar antin í stóran mun ella í ávísan mun eru góð. Ein fjórðingur heldur ikki viðurskiftini vera so góð.

### *3.2.4. Fakliga umhvørvið*

45 % av lærarunum halda, at teirra umhvørvi er fakliga kveikjandi og spennandi. Av hesum eru tað tó bara góð 5 %, sum siga, at hetta í stóran mun er galdandi. Meiri enn helvtin heldur, at fakliga umhvørvið einans í minni mun (35 %) ella als ikki er kveikjandi og spennandi (19 %).

Svarini til spurningin um, í hvønn mun tey halda, at umhvørvið er eyðkent av stagnasjón, vísir nakað tað sama. Meira enn helvtin halda, at umhvørvið er ikki eyðkent av stagnasjón. Hinvegin halda heili 40 %, at hetta antin í ávísan ella í stóran mun er galdandi. Fyri nakrar lærarar kann áskoðanin um, at teirra arbeiðspláss er eyðkent av fakligari stagnasjón helst vera ein kelda til persónliga frustrasjón, tí nýggj krøv til skúlan gera, at broytingar mugu fara fram.

Umframt dámligar starvsfelagar og góða løn, so løgdu nógvir lærarar dent á spennandi og krevjandi avbjóðingar, tá ið teir lýstu "tað góða arbeiði". Hetta kann tulkast sum, at lærar-

ar leggja dent á eitt gott fakligt umhvørvi, sum kravið til skúlan eisini eigur at vera. Tann útbreidda hugsanin, at skúlin ikki er serliga kveikjandi fakliga, er tí rættuligani óheppin, og eigur at vera tikin í størsta álvara.

## 3.3. Fysisku karmarnir

Heilt nógvir lærarar eru ikki nøgdir við fysisku karmarnar á skúlunum, har teir arbeiða. Næstan tveir triðingar (65 %) halda, at karmarnir antin í minni mun ella als ikki eru nøktandi. 27 % vísa á, at karmarnir í ávísan mun eru nøktandi, meðan einans 8 % av teimum, ið hava svarað spurnablaðnum, í stóran mun eru nøgd við teir fysisku karmarnar í skúlunum.

**Fysisku karmarnir ikki nøktandi**




Sp.: Lýsing av skúlanum: Teir fysisku karmarnir eru nøktandi?

At hetta er nakað sum kann vera við til at minka um trivnaðin varð víst á í nøkrum av viðmerkingunum. Ein lærari vísti t.d. á, at *"Tá ein situr í einum skúla, har fakligu rammurnar ikki eru í lagi, kann tað mangan verða strævið at vera lærari. Nógvir skúlar eru ikki tilpassaðir soleiðis, at tú kanst uppfylla krøvini í skúlalógini. Tí skuldi tað verði kravt av landsstýrinum, at skúlaviðurskiftini úti í teimum ymsu kommunum vóru í lagi. Leiðslurnar á skúlunum mugu berjast við kommunurnar um út- og umbyggingar á skúlunum, og tað kann mangan vera strævið*" (Maður, 50-54 ár).

## 3.4. Næmingar við serligum tørvi

Tað eru nógvir næmingar, sum hava ein serligan tørv. Nógvar orsøkir kunnu vera til hetta, t.d. børn sum eru seinment, børn, sum hava likamlig brek, eins og børn, sum í eitt tíðarskeið hava ringt við at læra tað, sum tey skulu, t.d. lesi-, skrivi- og roknitrupulleikar. Tað sernámsfrøðisliga virksemi at hjálpa og loysa hesum trupulleikum verður skipað av Sernámsdeplinum og fer bæði fram á Sernámsdeplinum eins og í fólkaskúlanum. Játtanin til sernámsfrøðisliga økið er økt nakað tey seinastu árini. Men hóast hetta er játtanin nakað nógv minni enn tað, sum umboð fyri fólkaskúlan halda vera neyðugt.

Sum vit síggja í myndini høgrumegin er tað ein heilt stórur meiriluti av teimum, sum hava svarað (85 %), ið heldur, at skúlaverkið einans í minni mun ella als ikki er ført fyri fyri at taka sær av næmingum við serligum tørvi. Av hesum eru tað heili 38 % sum meina, at skúlaverkið als ikki er ført fyri at røkta hesa uppgávuna. Harafturímóti eru tað einans 13

%, ið halda at skúlaverkið í ávísan mun klárar at taka sær av næmingum við serligum tørvi.

**Skúlaverkið ikki ført fyri at taka sær av næmingum við serligum tørvi**




Sp.: Í hvønn mun heldur tú, at føroyska skúlaverkið er ført fyri at taka sær av næmingum við serligum tørvi?

### 3.5. Samandráttur

Gjøgnumgongdin av innhýsisviðurskiftum skúlans vísir, sum væntað, at trivnaður lærarans í fólkaskúlanum er eitt ógvuliga samansett problemøki. Millum tey nøktandi viðurskiftini er, at allarflestu lærarir halda seg hava góð sambond við næmingarnar, og flestu lærarir halda eisini, at næmingarnir eru virknir, fylgja við og gera soleiðis, sum lærarin sigur. Eisini vera viðurskiftini við starvsfelagar og leiðslu í høvuðsheitum lýst at vera góð. Sum heild kann skúlin tí framvegis lýsast sum eitt gott sosialt umhvørvi at vera í, og má hetta sigast at vera eitt gott støði at byggja víðari á.

Tann ávísa ónøgdin, sum avspeglast í áðurnevndu viðurskiftum, m.a. við leiðslustílin, kann møguliga skyldast viðurskifti á einstøkum skúlum, men vit hava ikki møguleika at eftirkanna hetta. Ein onnur orsøk kann vera, at tær nógvu broytingar sum fara fram í dagsins skúla, náttúrliga vilja geva spenningar millum leiðslu og lærarar.

Mest týðiliga kemur fram, at nógvir lærarar ikki halda seg kunna liva upp til ásetingarnar um næmingalagaða undirvísing, hóast teir í prinsippinum taka undir við hesum. Tað kemur greitt fram, at ivamál er millum lærarar um, hvat skal skiljast við næmingalagaða undirvísing, og hvat virði er av toymunum og ráðlegging. Hesi viðurskifti eru greitt ein kelda til frustrasjón og økta arbeiðsbyrðu, sum samstundis økist við, at ein stórur partur av lærarunum halda, at ov nógv tíð fer til tær umsitingarligu uppgávurnar, og at skúlin ikki hevur eitt nóg kveikjandi fakligt umhørvi at bjóða teimum.

Hví rættuliga nógvar frustrasjónir eru í sambandi við tær broytingar, sum fólkaskúlalógin førir við sær, kunnu vera nógvar forkláringar uppá. Allar størri broytingar føra við sær

ótrygd og frustrasjónir, men sjálvsagt er hetta eisini ein spurningur um, hvussu tær vera taklaðar.

Orsøkir til hetta kunnu vera, at íverksetanin av hesum nýggju tiltøkum eru ov illa fyrskipaði frá myndugleikum og leiðslu, at ov lítil orka (peningur/arbeiðsmegi) verða sett av til hesi átøk, ella tí ein stórur bólkur av lærarum beinleiðis eru móti hesum broytingum.

Serliga áhugavert er tann kynsligi munurin, sum hesin parturin av kanningini vísir. Meðan eins nógvar kvinnur og menn taka undir við næmingalagaðari undirvísing, so eru tað greitt kvinnurnar, sum eru meiri positivar mótvegis teimum broytingum, sum hetta slagið av undirvísing førir við sær, t.e. meiri ráðlegging og samstarv millum lærarar. Menninir geva størri útrykk fyri, at tíðin fer til ov nógvar fundir heldur enn undirvísing.

Av meiri almennum broytingum kemur greitt fram, at uppalandi uppgávan tekur alt meiri av tíð lærarans. Fyri ein rættuliga stóran part av lærararunum tykist hetta faktum eisini at vera ein stór kelda til frustrasjón og harvið við minkandi trivnaði í arbeiðinum. Aftur her er tó talan um ein ‚loysiligan' trupulleika, sum sæst aftur í at allarflestu lærar meta seg hava góð viðurskifti við næmingarnar. Eisini her er ein kynsligur munur, tí tað eru serliga kvinnurnar, sum vísa á at uppalandi uppgávan fyllir meiri í teirra starvi.

# 4. Uttanhýsis viðurskifti lærarans

Í partinum omanfyri sóu vit, at lærarar sum heild vóru positivir í mun til teirra innanhýsis viðurskifti, men at tað eisini vóru trupulleikar. Tann einstaki skúlin virkar tó ikki í einum tómrúmi, men hevur víttfevnandi sambond við fólk og stovnar uttanfyri egnu gátt. Hesi uttanhýsis viðurskifti hava avgerandi ávirkan á fortreytirnar hjá skúlanum at virka. Hetta umfatar m.a. tey krøv, sum almennu myndugleikarnir seta til skúlarnar og lærararnar, so sum lógir, eftirlit og kunngerðir. Møguleikarnir fyri eftirútbúgving vera eisini givnir uttanfyri skúlagátt, eins og læraraútbúgvingin, sum er eitt krav fyri at fáa fast lærarastarv, má roknast sum partur av teimum uttanhýsis viðurskiftunum. Umframt hetta hava foreldrini eisini stóran ávirkan á skúlarnar. Tað eru hesi viðurskifti, sum vera viðgjørd í hesum partinum.

## 4.1. Nýggj lóg og tiltøk

Í 1997 varð nýggj fólkaskúlalóg samtykt í løgtinginum. Áðrenn lógin varð løgd fyri løgtingið, varð eitt umfatandi arbeiði gjørt av Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans. Hesin bólkur varð í 1994 settur at endurskoða, dagføra og gera uppskot um møguligar broytingar í gomlu fólkaskúlalógini. Gamla fólkaskúlalógin hevði tá verið nærum óbroytt síðani 1979, burtursæðfrá smærri broytingum, ið blivu gjørdar í 1992 og 1993.

Ráðleggingarnevndin varð sett, tí tað varð hildið vera ”*skilagott hjá okkum at fáa hugsanir festar á blað um t.d. betur tíðarhóskandi karm, endamál, innihald og vav fólkaskúlans og annars við atliti at tí, sum serstakliga eyðkennir tað námsfrøðiliga rákið uttan um okkum, og sum má haldast at vera viðkomandi her hjá okkum, nú eitt tílíkt álit skal verða skrivað.*” (Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans, 1996, s. 7).

Nýggja fólkaskúlalógin hevði stórar broytingar og avbjóðingar við sær. Tað tykist sum hesar avbjóðingar leggja eitt økt trýst á nógvar lærarar. Hóast hetta heldur ein greiður meiriluti (81%) av lærarunum nýggju fólkaskúlalógina vera nøkulunda ella góða. Út móti helvtin av teimum, sum hava svarað spurnarblaðnum, meta innihaldið av fólkaskúlalógini vera gott ella sera gott. Ein stórur triðingur halda, at innihaldið er nøkulunda. Hinvegin so eru 15%, sum halda innihaldið av lógini vera antin vánaligt ella sera vánaligt.

**Taka undir við fólkaskúlalógini**




Sp.: Hvussu metir tú innihaldið av nýggju fólkaskúlalógini?

Fleiri hava í skrivligum viðmerkingum víst á, at broytingarnar frá myndugleikunum eru ov nógvar og eru komnar ov knapliga. Tað tykist eisini sum um nakrir lærarar halda, at broytingarnar, sum verða settar í verk, ikki svara nóg væl til tann veruleikan, ið teir uppliva í teirra dagliga arbeiði. Ein lærari skrivar til dømis, at*”lógirnar verða smoygdar niður yvir teg uttan at tú hevur havt møguleika fyri at fyrireika teg eitt nú við skeiðum o.l.”*
(Maður, 45-49 ár).

Ein annar lærara orðar sína ónøgd soleiðis *”Alt ’hetta nýggja’, ið verður dýkt niður á okkum ’gomlu’ uttan at nakar spyr fyrst, følist sera tungt, tí nógv av tí riggar best á pappírinum.”*
(Kvinna, 55-59 ár).

Ein triði skrivaði: *”Nýggjar skúlalógir verða førdar inn í skúlan uttan fyrilit, uttan møguleika fyri fyrireiking hjá lærara, nýggjar lærubøkur ikki tøkar til nýggja lóg, verður innført í bulk í staðin fyri í bitum. Tá lógir verða gjørdar verður í ov lítlan mun lurta eftir lærarunum, fólk, ið kenna lítið til skúlaskap taka avgerðirnar, og verður ofta bert skunda ígjøgnum. Apa okkum eftir londum við milliónatali av íbúgvum, ístaðin fyri at skapa lógir egnaðar til føroyska skúlan og samfelagið.”*
(Maður 50-54 ár).

Eitt, sum hevur verið nógv frammi í kjakinum um nýggju fólkaskúlalógina, er spurningurin um vantandi fíggjarliga játtan til at seta í verk lógina. Ein lærari viðmerkti eisini: *”Nýggja skúlalógin er góð, men tað skuldu fylgt fleiri tímar við, so betri stundir vóru at fylgt lógini. T.d. til at tilrættisleggja næmingalagaða undirvísing.”*
(Kvinna, 50-54 ár).

## 4.2. Førleiki og eftirútbúgving

Í hvønn mun ein persónur trívst í sínum starvi er í ávísan mun tengt at, hvørt viðkomandi heldur, at hann ella hon klárar tær uppgávur, sum liggja í starvinum. Fyri at fáa fast starv sum lærari í Føroyum, er tað eitt krav, at ein hevur læraraútbúgving. Tað er í útbúgvingini, at grundarsteinurin fyri fakliga førleikanum hjá tí einstaka verður lagdur.

Av truplum viðurskiftum sóu vit í undanfarna parti, at stórur partar av lærarunum ikki halda, at skúlin var fakliga kveikjandi, meðan nógvir lærarar eisini hildu, at skúlin var eyðkendur av stagnasjón. Vit hava eisini sæð, at nógvir lærarar halda tað vera ringt at liva upp til meginregluna um næmingalagaða undirvísing, eins og nógvir halda, at tey fakligu krøvini vóru økt. Stór semja var eisini um, at uppalandi uppgávan fyllir meir nú enn fyrr.

Nógv kjak hevur verið – bæði í Føroyum og uttanlands – um, hvussu læraraútbúgvingin skal skipast, nú krøvini til lærarstarvið á mangan hátt eru broytt. Føroya Lærarafelag hev-

ur tikið stig til at endurskoða føroysku læraraútbúgvingina. Tað hevur t.d. verið umrøtt, hvørt læraraútbúgvingar eiga at gerast eitt sindur ”smalri”, soleiðis at lærarar fáa størri vitan í fáum fakum, heldur enn í fleiri ymiskum. Hvat halda lærarar um læraraútbúgvingina, sum teir hava tikið?

Flest allir lærarar (80%) halda antin, at útbúgvingin hevur fyrireikað teir væl ella nøkulunda uppá lærarastarvið. Fleiri enn 50% halda, at útbúgvingin hevur fyrireikað teir nøkulunda. Ein góður fjórðingur av teimum, ið svaraðu spurnarblaðum, halda, at útbúgvingin hevur fyrireikað teir antin væl ella sera væl. Eftir eru 18%, sum halda seg hava fingið ein ov vánaliga útbúgving.

**Flest kenna seg nøkulunda fyrireikað uppá lærarastarvið**




Sp.: Hvussu heldur tú, at læraraútbúgvingin hevu fyrireikað teg uppá lærarastarvið?

| | Føroyar | Danmark |
|---|---|---|
| **Sera væl** | 2,5 | 13.5 |
| **Væl** | 19.6 | 34.6 |
| **Nøkulunda** | 56.3 | 42.3 |
| **Illa** | 17.1 | 5.8 |
| **Sera illa** | 3.8 | 1.9 |
| **Veit ikki / Annað** | 0.8 | 1.9 |

Tað tykist sum um, at lærarar, ið hava tikið útbúgving sína í Danmark, eru meiri nøgdir enn teir, ið hava tikið útbúgvingina í Føroyum. Út við helvtin av teimum, sum hava tikið útbúgvingina í Danmark, siga seg vera væl ella sera væl fyrireikaði uppá lærarastarvið, í mun til at tað bara er fjórði hvør av teimum, sum hava tikið útbúgvingina í Føroyum, ið siga tað sama[10].

Flestu lærarar meta seg hava neyðuga fakliga førleikan, til at lúka krøvini, ið lærarastarvið setur. Tað eru fleiri enn 80% av teimum, ið hava svarað spurnarblaðnum, ið meina, at teir hava tann førleika, sum skal til at røkja teirra starv. Harav halda um 45%, at teirra førleiki antin er sera góður ella góður. Umframt hesi, so eru smá 40%, sum halda teirra førleika vera nøktandi. Eftir eru góð 15%, sum ikki halda teirra egna førleika vera

**Flest meta fakliga førleikan vera nóg góðan**




Sp.: Hvussu metir tú tín fakliga førleika at veraí mun til krøvini í tínum starvi?

[10] Sigast skal at tað einans eru 52 av teimum, sum hava svarað, ið hava tikið teirra útbúgving í Danmark.

nóg góðan til at røkja tær uppgávur sum eru.

Tann gjøgnumgangadi stóra tiltrúgvin til egnan førleika kann tulkast sum, at útbúgvingin fyri nógv hevur verið ein nóg góð fyrireiking. Men tað er helst eisini soleiðis, at lærarar økja um teirra fakliga førleika, so hvørt sum teir fáa fleiri arbeiðsroyndir.

Lærarar vórðu tí eisini spurdir, hvørt teir hildu fakligu krøvini vóru økt seinnu árini. Umleið tveir triðingar hildu, at tey fakligu krøvini vóru økt seinnu árini.

Lærarastarvið krevur bæði fakligan og námsfrøðisligan førleika. Ein part av hesum kann lærarin ogna sær undir útbúgvingini, men sum ein lærari hevur viðmerkt: ”V*iðvíkjandi fakliga førleikanum, er man allatíðina noyddur at fornýggja seg, tað er ikki nakað sum bara er har*” (Kvinna, 35-39 ár).

**Efturútbúgving er neyðug**




Sp.: Eru eftirútbúgvingar og førleikamenning neyðug tínum starvi?

Við hesum í huga, er tað ikki óvæntað, at so at siga allir lærarar halda, at eftirútbúgving og førleikamenning er neyðug, soleiðis at lærarar fáa vegleiðing og umstøður at mennast í mun til nýggju krøvini.

Í hesum sambandi er tað hugsunarvert, at einans góð 15% halda, møguleikarnar fyri eftirútbúgving vera nøktandi, meðan heili 80% halda møguleikarnar fyri eftirútbúgving í minni mun ella als ikki vera nøktandi. Tann breiða semjan um, at møguleikarnir fyri eftirútbúgving ikki eru nøktandi, nýtist ikki at vera ein kritikkur av teimum stovnum, sum bjóða eftirútbúgving, men kanska meiri tað, at táttaninar eru ov lágar og tilboðini tí ikki nóg nógv, og at tað kanska er ov ringt at sleppa á skeiðini.

**…men møguleikarnir fyri eftirútbúgving ikki nøktandi**




Sp.: Heldur tú, at møguleikarnir fyri eftirútbúgvin eru nøktandi?

## 4.3. Viðurskiftini millum lærarar, foreldur og almenningin

Tað er av týdningi fyri egnan samleikan, hvussu ein verður mettur millum fólk, starvsfelagar og av sínum arbeiðsgevara. Stóri týdningurin fólkaskúlin hevur í samfelagnum svitast ikki, og hetta vil sjálvsagt vísa seg aftur í sjálvum lærarastarvinum. Eins og víst varð á í 1. parti, so hava samfelagsligu broytingarnar ført við sær stórar broytingar í lærarastarvinum, broytingar sum seta nýggj og størri krøv til lærarastarvið. Tað vóru greitt hesar broytingar, sum sóust aftur í úrslitunum í 2. parti. Ein annara háttur at lýsa hesar broytingar er at hyggja eftir leiklutinum hjá bygdalæraranum fyri nøkrum ártíggjum síðani. Í bók síni um føroyska skúlan, lýsir Ludvig Petersen leiklutin hjá læraranum soleiðis:

"*Læreren var ofte i sig selv en kulturel institution i det lille bygdesamfund. Han var bl.a. formand i forstanderskabet og sekretær, formand og sekretær for sygekassen, medlem af meninghedsrådet samt organist og/eller degn i kirken. Det var også læreren folk kunne komme til, når serlige opgaver skule udføres skriftligt. Alle disse ekstra arbejdsopgaver var ulønnede.*" (Ludvig Petersen, 1994, s. 95).

Hetta sitat vísir, at lærarin hevði tign í bygdini. Hann var jú fyrst av øllum ein lærdur maður, og tá vóru ikki so nógv lærd fólk. Tað er framvegis sdeiðis, at lærarar hava eina røð av ymsum álitisstørvum, bæði lokalt og innan landsfevnandi viðurskifti. Men við hækkaða útbúgvingarstøðinum í Føroyum, er lærarin bert ein av mongum við góðari útbúgving, og harvið ein av mongum við førleika til at loysa t.d. bókligar uppgávur. Tað er helst ongin, sum *ikki* heldur at hetta er gott, men hetta hevur kanska verið við til at broyta støðuna hjá lærarunum í ymsu lokalsamfeløgunum, samstundis sum ákoyringar koma móti bæði skúlaverkinum og lærarum frá almeninginum eins og frá politiskum umboðum.

Hvussu halda lærarar, at virðingin fyri lærarastarvinum er broytt tey seinastu árini? Fleiri enn 60 % av teimum, sum hava svarað spurnarblaðnum, halda, at virðingin, sum almenningurin hevur fyri lærarastarvinum, er broytt til tað verra seinastu árini. Umleið 25% halda, at støðan er óbroytt, meðan einans 5 % halda, at virðingin er økt seinastu árini.

**Virðingin fyri lærarastarvinun broytt til tað verra**




Sp.: Heldur tú, at virðingini hjá almenninginum fyri lærarastarvinum er broytt tey seinastu árini?

## 4.4. Lærarar og foreldrini

Foreldrini hava við teimum nýggju skúlastýrunum fingið økta ávirkan á skúlaleiðsluna. Eisini í tí dagliga arbeiðnum hava lærarar samskifti við foreldur. Samskifti við foreldrini er eisini ásett í §2 í lógini, har tað m.a. stendur, at innlæringin skal fara fram í samstarvi við foreldrini. Umframt hetta, so skal tann meiri umfatandi serundirvísing fremjast í samráð við foreldrini (§ 12). Í §14 verður víst á, at næmingar og foreldur skulu hava at vita, hvat skúlin heldur, at næmingarnir fáa burturúr undirvísingini. Men hvussu halda lærarar, at viðurskiftini eru millum teir og foreldrini?

Lærarar halda, at viðurskiftini teir hava við foreldrini eru góð. Sum vit síggja á myndini, so lýsa 85% av lærarunum viðurskiftini millum teir og foreldrini sum góð, meðan einans 1% av teimum, sum hava svarað, lýsa viðurskiftini at vera vánalig.

Umframt at flest allir lærarar hava góð viðurskifti við foreldrini, so er tað ein lítil helvt av lærunum, sum halda, at viðurskiftini eru vorðin betri tey seinastu árini, umleið ein triðingur halda at viðurskiftini eru óbroytt, meðan um 10% halda, at viðurskiftini eru versnaði.

**Viðurskiftini millum lærarar og foreldur góð**




Sp.: Hvussu heldur tú, at viðurskiftini eru millum teg og foreldrini, sum heild?

**Viðurskiftini millum lærarar og foreldur broytt til tað betra**




Sp.: Heldur tú, at viðurskiftini millum læ rarar ogforeldur eru blivin betur ella verri tey seinnu árini?

Men hóast flestu lærarar lýsa viðurskiftini millum teir og foreldrini sum góð, so eru tað heili 40% sum halda, at foreldrini einans í minni mun hjálpa børnunum við heimauppgávum, meðan 3% halda, at foreldrini í ongan mun halda at foreldrini hjálpa børnunum nóg væl. Hinvegin eru tað 55%, sum í ávísan ella stóran mun halda, at foreldrini hjálpa sínum børnum við skúlatingunum.

**Foreldrini hjálpa børnunum ov lítið við heimauppgávum**




Sp.: Í hvønn mun heldur tú, at foreldrini hjálpa børnunum við heimauppgávum?

Burtursæð frá at samskifti millum skúlan og foreldrini er kravt í lógini, so eru tað eisini nógv viðurskifti, sum bert ella best kunnu gerast í felagskapi millum heim og skúla. Tað er tí ein trupulleiki í dagliga arbeiðnum hjá nógvum lærarum, at teir ikki fáa tann neyðuga stuðulin frá foreldrunum.

## 4.5. Samandráttur

Í hesum partinum eru viðgjørd nøkur av teimum viðurskiftum uttan fyri skúlans gátt, sum hava ávirkan á fortreytirnar hjá skúlanum at virka og mennast. Eitt av hesum viðurskiftum er tann nýggja fólkaskúlalógin, sum kom í gildi í 1997. Hendan lógin hevur góða undirtøku millum lærararnar, við tað at flestu lærarar (81%) meta innihaldið í lógini vera nøkulunda ella gott.

Lærarar fáa teirra grundleggjandi fakliga førleika við at taka eina læraraútbúgving, og flestu lærarar (81%) halda, at læraraútbúgvingin hevur fyrireikað teir nøktandi til tær uppgávur, lærarastarvið krevur. Hóast hetta, ber ikki til at siga, at lærarar eru ovurfegnir um læraraútbúgvingina. Tað eru nevnliga meira enn helvtin, sum heldur, at útbúgvingin hevur fyrireikað teir nøkulunda, meðan einans ein góður fjórðingur heldur, at útbúgvingin hevur verið ein góða ella ein sera góða fyrireiking til lærarastarvið. Umframt hetta, eru um 20%, ið halda seg hava fingið eina vánaliga útbúgving. Tað tykist sum, at tey, ið hava tikið útbúgvingina í Danmark, í nakað størri mun eru nøgd, samanborið við tey, ið hava tikið útbúgvingina í Føroyum. Út við helvtin av teimum, sum hava tikið útbúgvingina í Danmark, halda seg vera væl fyrireikaði til lærarastarvið, meðan einans ein góður fjórðingur av teimum, ið hava tikið útbúgvingina í Føroyum halda tað sama.

Flest allir lærarar, ið hava svarað spurnarblaðnum, meta seg hava tann fakliga førleika, ið lærarastarvið krevur. Hóast hetta, so halda so at siga allir lærarar, at eftirútbúgving og førleikamenning er neyðug. Tað er tí ein trupulleiki, at einans 19 % av teimum, ið svaraðu

spurnarblaðum, halda, at møguleikarnar fyri eftirútbúgving og førleikamenning eru nøktandi, meðan 80 % ikki halda møguleikarnar vera nóg góðar.

Breið semja tykist vera millum fólk um, at fólkaskúlin hevur ein avgerandi týdning í samfelagnum. Men kortini halda mera enn 60 % av lærarunum, at almenna virðingin fyri lærarastarvinum seinnu árini er broytt til tað verra.

Foreldrini hava stóra ávirkan á viðurskiftini í skúlanum. Tað er tí rættiliga positivt, at so at siga allir lærarar halda seg hava góð viðurskiftini við foreldrini og at næstan 50 % av teimum, sum svaraðu spurnarblaðnum, søgdu, at viðurskiftini við foreldrini vóru broytt til tað betra seinnu árini.

# 5. Tey ónøgdu og tey nøgdu

Í byrjanini av frágreiðingini varð hugt eftir, hvussu lærarar trívast sum heild. Har sóu vit, at umleið 75% av lærarunum í ávísan ella stóran mun vóru nøgdir við teirra starv. Harumframt vóru tað umleið 25%, sum søgdu, at tey einans í minni mun ella als ikki vóru nøgd. Í hesum partinum verða sjónarmiðini hjá teimum, sum trívast, samanborin við sjónarmiðini hjá teimum, sum ikki trívast. Á hendan hátt fáa vit ábendingar um, hvat hevur ávirkan á, um fólk trívast ella ikki. Hetta er av týdningi, millum annað fyri at vita, hvat gerast kann við teir trupulleikar, sum eru. Tørvur er á lærarunum í dag. Heili 83 % av teimum, sum ikki trívast, siga seg av álvara hava umhugsað at søkt annað starv seinnu árini. Tað er tí týdningarmikið at fáa minkað um hendan trupulleikan. Umframt hetta er tað ein stórur trupulleiki fyri føroyska fólkaskúlan sum arbeiðspláss, at fjórða hvørt starvsfólk ikki trívist.

Í hesum partinum verða tey, ið hava svarað, flokkaði í tveir heldur grefligar bólkar, ávíkavist ”tey nøgdu“ og ”tey ónøgdu”. ”Teynøgdu” eru tey, sum hava svarað, at tey í stóran mun ella í ávísan mun eru nøgd við teirra arbeiði. Hinvegin umfata ”tey ónøgdu“ tann bólkin av lærarum, sum hevur svarað, at tey í minni mun ella als ikki eru nøgd við teirra arbeiði.

Í parti 2.1 sóu vit, at umleið 70% av lærarunum hildu, at teirra arbeiði í ávísan ella stóran mun svaraði til tað, sum teir sjálvir lýstu sum “tað góða arbeiðið”. Tað eru nógv færri av teimum ónøgdu, sum halda, at teirra núverandi starv svarar til ”tað góða arbeiðið”. Einans 31% av teimum ónøgdu halda, at tey í stóran ella ávísan mun hava ”tað góða arbeiðið” í dag, meðan tilsvarandi talið hjá teimum nøgdu er 82%.

**Hevur tú tað góða arbeiðið?**




Sp.: Heldur tú, at tað er samsvar millum arbeiðið, sum tú hevur nú, og ”tað góða arbeiðið”, sum tú hugsaði um í svarinum omanfyri?

Trivnaðurin hjá teimum, ið ikki trívast, er eisini í stóran mun vorðin verri enn hann var fyri nøkrum árum síðani. Tað eru nevnliga 76% av teimum ónøgdu, ið siga seg trívast verri nú enn fyri nøkrum árum síðani, harafturímóti eru tað 35% av teimum nøgdu, sum trívast verri.

**Nøgdsemi broytt til tað verra seinnu árini**




Sp.: Er títt nøgdsemi við arbeiði broytt tey seinnu árini?

## 5.1. Arbeiðstíð og – mongd

Tað er sum heild ein meiriluti av lærarunum, sum halda, at mongdin av arbeiði er ov stór í mun til løntu arbeiðstíðina. Men tað eru væl fleiri av teimum ónøgdu, ið halda seg hava ov nógv at gera, nevnliga 76 %, meðan tað "einans" eru 57 % av teimum nøgdu.

Ov stórt arbeiðstrýst kann vera ein orsøk til, at út ímóti tveir triðingar av teimum ónøgdu lýsa skúlan, har tey arbeiða, sum eitt strongjandi umhvørvi. Hinvegin er tað ein góður triðingur av teimum nøgdu, sum halda, at tey arbeiða í einum strongjandi umhvørvi.

**Arbeiðsmongd og lønt arbeiðstíð**




Sp.: Hvussu metir tú samsvarið millum arbeiðsmongd og løntu arbeiðstíðina?

**Eitt strongjandi umhvørvið**




Sp.: Lýsing av skúlanm

## 5.2. Nýggj tiltøk

Seinnu árini eru fleiri nýggj tiltøk sett í verk í fólkaskúlanum. Til dømis næmingalagað undirvísing, skrivlig ráðlegging, arbeiði í toymum og formfestar samrøður við leiðsluna.

Hesar broytingar hava heimild í við nýggju fólkaskúlalógini. Í parti 4.1. varð víst á, at innihaldið í fólkskúlalógini hevur breiða undirtøku millum lærarar sum heild. Tað er eisini ein greiður meirilutin av teimum ónøgdu, ið halda innihaldið av fólkaskúlalógini vera antin gott ella nøkulunda. Men hóast hetta eru tað nakað nógv fleiri av teimum ónøgdu (26 %), sum halda innihaldi vera vánaligt, samanborið við 11% av teimum nøgdu.

Tað tykist sum, at tey, sum trívast illa, í minni mun taka undir við hesum nýggju átøkunum. Til dømis er undirtøkan fyri næmingalagaðari undirvísing nakað minni millum tey ónøgdu enn millum tey nøgdu, tó at undirtøkan hjá báðum bólkum kann sigast at vera rættiliga góð.

**Innihaldið av fólkaskúlalógini**




Sp.: Hvussu metir tú innihaldið av nýggju fólkaskúlalógini?

**Næmingalaga undirvísing**




Sp.: Í hvønn mun tekur tú undir við meginregluni um næmingalagaða undirvísing?

Tað eru munandi fleiri av teimum nøgdu, sum halda tað vera gott, at tey skulu lata inn skrivliga ráðlegging. Meðan góð 60 % av teimum nøgdu halda tað vera ein fyrimunur at arbeiða við skrivligari ráðlegging, so eru tað einans 40% av teimum ónøgdu. Og meðan tað eru 27 % av teimum nøgdu, sum halda ársætlanirnar vera óneyðugar og ein forargilig arbeiðsbyrða, so eru tað heili 49% av teimum ónøgdu.

## Hvat lærarar halda um skrivliga ráðlegging?




Sp.: Hvat heldur tú um at lærarar skulu lata inn skrivliga ráðlegging?

Tað er í dag eitt krav, at lærarar skulu arbeiða í so-kallaðum toymum. Endamálið við hesum er at samskipa frálæruna í teimum einstøku flokkunum betri. Tað er ein ávísur munur á, hvussu bólkarnir av nøgdum og ónøgdum meta týdningin av at arbeiða í toymum. Tveir triðingar av teimum nøgdu halda toymini stimbra fakliga kjakið, meðan einans ein lítil helvt av teimum ónøgdu, halda tað sama.

## Toymi stimbrar fakliga kjakið




Sp.: Í hvønn mun stimbrar arbeiði í toymi fakliga kjakið?

Fleiri viðurskifti hava gjørt, at fleiri fundir vera hildnir nú enn fyrr. Tað eru mong, bæði millum tey nøgdu og ónøgdu, sum halda at ov nógv tíð verður nýtt til fundarvirksemi. Tó eru nakað fleiri av teimum ónøgdu, sum halda, at ov nógv tíð verður nýtt til fundarvirksemi. Umframt hetta eru tað eisini eru lutfalsliga fleiri av teimum ónøgdu, ið halda at ov lítil tíð verður nýtt til fundarvirksemi.

## Tíðin brúkt til fundarvirksemi o.l.




Sp.: Hvat heldur tú um tíðina, sum verður brúkt til fundarvirksemi o.l. á tínum skúla?

Samanfatandi kann sigast, at tey, ið sum heild eru ónøgd, í minni mun enn hini taka undir við teimum nýggju tiltøkunum. Serliga er munurin stórur, tá ið talan er um spurningin um, hvørt tey halda tað

vera ein fyrimunur at skula lata inn skrivliga ráðlegging eins og spurningin, um hvat virði er av arbeiðnum, sum fer fram í toymum.

## 5.3. Næmingarnir

Bæði tey, sum eru nøgd, og tey, sum ikki eru nøgd, hava góð viðurskifti við næmingarnar. Ongin av teimum ónøgdu siga seg hava vánalig viðurskifti við næmingarnar. Hetta stendur eisini longur frammi í frágreiðingini, har skrivað varð, at tað ikki vóru viðurskiftini við næmingarnar, sum gjørdu, at nógvir lærarar trívast verri nú enn teir hava gjørt. Hóast tey ónøgdu ikki lýsa síni viðurskifti við næmingarnar neiligt, so eru teirra viðurskifti sum heild ikki eins góð og hjá teimum "nøgdu".

**Viðurskiftini við næmingarnar**




Sp.: Hvussu heldur tú, at viðurskiftini, sum heild, eru millum teg og næmingarnar?

**Viðurskifti í flokkinum**




Sp. Lýsing av viðurskiftunum í flokkinum

Tað eru t.d. munandi færri av teimum ónøgdu, sum halda møguleikarnar fyri at gjøgnumføra ætlaðu undirvísingina vera góðar. Meðan tað eru 46% av teimum nøgdu, ið halda møguleikarnar vera góðar, so eru tað einans 19% av teimum ónøgdu. Og meðan einans

12% av teimum nøgdu halda møguleikarnar vera vánaligar, so eru tað heili 31 % av teimum ónøgdu.

Tað eru eisini fleiri av teimum ónøgdu, sum halda, at møguleikarnir fyri at hjálpa øllum næmingunum vera vánaligar, og tilsvarandi færri, ið halda møguleikarnar vera góðar.

Tá ið tað kemur til spurningarnar um møguleikarnar at loysa sosialar trupulleikar og ó-semjur, eins og møguleikarnar fyri at stýra atferðini hjá næmingunum, so er lítil munur á, hvussu bólkarnir av ávíkavist nøgdum og ónøgdum hava svarað.

Samanumtikið ber til at siga, at hóast allir lærararnir sum heild hava góð viðurskifti við næmingarnar, so eru fleiri av teimum ónøgdu, sum tykjast at hava ávísar trupulleikar í hesum sambandi.

## 5.4. Starvsfelagar og leiðsla

Meðan munurin á, hvussu báðir bólkarnir uppfata síni viðurskifti við næmingarnar, ikki var so stórur, so er støðan øðrvísi, tá ið tað snýr seg um viðurskiftini við starvsfelagarnar. Tað tykist nevnliga, sum tað eru stórir munir á, hvussu tey nøgdu og tey ónøgdu lýsa við urskiftini við starvsfelagarnar. Sum heild ber til at siga, at tey ónøgdu veruliga trívast verri í arbeiðsumhvørvinum.

### 5.4.1. Starvsfelagar

**Viðurskiftini við starvsfelagar**




Sp. Lýsing av skúlanum

At tað er munur á trivnaðinum hjá teimum nøgdu og teimum ónøgdu, sæst við at hyggja at samanberingunum í myndini omanfyri. Meðan heili 86% av teimum nøgdu halda tað kollegiala umhvørvið vera gott, so eru tað væl færri av teimum ónøgdu, sum halda tað sama (58%).

Myndin er tann sama, tá ið spurt verður um, hvørt skúlin kann sigast at hava eitt gott og vinarligt umhvørvi. Heili 88% av teimum nøgdu halda hetta vera galdandi. Hinvegin er talið av teimum ónøgdu, sum halda hetta, nakað væl lægri, 63%. Tað er vert at leggja til merkis, at 19% av teimum ónøgdu halda, at umhvørvið í skúlanum als ikki kann lýsast sum eitt gott og vinarligt umhvørvi.

Í spurnarkanningini varð eisini spurt, hvørt lærarar hildu, at starvsfelagar stuðlað hvørjum øðrum og loysa trupulleikar í felag. Ein lítil helvt (44%) av teimum ónøgdu helt, at støðan antin í stóran ella í ávísan mun var soleiðis. Hinvegin so helt ein góð helvt (55%) ikki, at fólk stuðla hvørjum øðrum. Munandi fleiri av teimum nøgdu lýstu viðurskiftini positivt. Tað vóru nevnliga 70% av teimum nøgdu, sum í ávísan ella stóran mun hildu, at fólk stuðla hvørjum øðrum og loysa trupulleikar í felag, og ”einans” 29% hildu at hetta ikki var galdandi.

Ein annar spurningur var, um tey hildu, at ein køvandi dámur kundi sigast vera yvir skúlanum. Aftur her er ein rættiliga stórur munur á, hvussu tey nøgdu og tey ónøgdu lýsa viðurskiftini. Tað vóru einans fá av teimum nøgdu, sum halda hetta vera eina rímuliga lýsing av skúlanum (16%), meðan myndin er ein onnur, tá tað kemur til tey ónøgdu. Har vóru tað heili 44%, sum antin í stóran ella í ávísan mun hildu, at tað var ein køvandi dámur yvir skúlanum.

### *5.4.2. Ósemjur*

Tað er eisini munur á, hvussu tey nøgdu og tey ónøgdu svara spurningin um, hvørt tað eru nógvar óloystar ósemjur í skúlanum, har tey arbeiða. Meðan 55% av teimum ónøgdu halda tað vera nógvar óloystar ósemjur, so eru tað 33% av teimum nøgdu.

Tað hevði verið spennandi at vita, um lærarar úr ávísum skúlum eru samdir um, hvørt nógvar ósemjur eru, ella um lærararnir á somu skúlum tulka viðurskiftini ymiskt. Tað er tó ikki møguligt við støði í hesum tilfarinum at siga nakað um hetta.

Spurt var eisini, hvørt tey hildu, at tað seinnu árini hava verið fleiri ella færri ósemjur á teirra arbeiðsplássi. Eisini her var stórur munur á, hvussu tey nøgdu og tey ónøgdu lýstu viðurskiftini. Tað vóru nevnliga 51% av teimum ónøgdu, sum hildu, at tað høvdu verið fleiri ósemjur seinnu árini. Tilsvarandi talið fyri tey nøgdu var munandi lægri – 28%.

**Óloystar ósemjur**




Sp.: Tað eru nógvar óloystar ósemjur (Lýsing av skúlanum og arbeiðsumhvørvinum í skúlanum)?

**Fleiri ósemjur seinnu árini**




Sp.: Heldur tú, at tað seinnu árini hava verið fleiri ella færri ósemjur á tínum arbeiðsplássi?

### *5.4.3. Fakliga umhvørvið*

Bólkarnir av ávíkavist nøgdum og ónøgdum lýsa tað fakliga umhvørvið rættiliga ymiskt. Nógv av teimum ónøgdu (45%) halda, at fólk eru opin fyri nýggjum uppskotum og tiltøkum. Hinvegin eru tað meira enn 50% av teimum ónøgdu, sum einans í minni mun ella als ikki halda, at fólk taka væl undir við nýggjum uppskotum. Harafturímóti halda tey nøgdu í munandi størri mun, at teirra starvsfelagar eru opnir fyri nýggjum hugskotum og tiltøkum. Tað eru nevnliga 77% av teimum, sum halda hetta vera galdandi, meðan 22% halda, at fólk í minni mun ella als ikki eru opin fyri uppskotum og tiltøkum.

Beinleiðis spurd um tey hildu umhvørvið vera fakliga kveikjandi og spennandi, svaraðu bólkarnir eisini sera ymiskt. Tað vóru 54% av teimum nøgdu, sum hildu, at skúlin í stóran ella ávísan mun hevði eitt fakliga og kveikjandi umhvørvið, meðan einans 10 % hildu, at hetta als ikki var galdandi.

Myndin sum tey ónøgdu høvdu av skúlanum var heilt øðrvísi. Tað vóru einans 17% av teimum ónøgdu, sum hildu at tað bar til at lýsa umhvørvið sum fakliga kveikjandi og spennandi. Harafturímóti hildu heili 43% at umhvørvið als ikki kundi lýsast við hesum orðum.

Eitt annað tekin, um at fleiri av teimum ónøgdu ikki halda tað fakliga umhvørvið vera so sterkt, er, at 58% svaraðu at umhvørvið í ávísan ella stóran mun var eyðkent av stagnation. Sama talið fyri tey nøgdu var 35%. Undrunarvert er tó, at meira enn ein triðingur av teimum, sum

**Eru fólk opin fyri uppskotum og nýggjum tiltøkum?**




Sp.: Fólk eru opin fyri uppskotum og nýggjum tiltøkum (Lýsing av skúlanum og arbeiðsumhvørvinum í skúlanum)?

**Er umhvørvið fakliga kveikjandi og spennandi?**




Sp.: Umhvørvið er fakliga kveikjandi og spennandi (Lýsing av skúlanum og arbeiðsumhvørvinum í skúlanum)?

**Er umhvørvið eyðkent av stagnatión?**




Sp.: Umhvørvið er eyðkent av stagnatión (Lýsing av skúlanum og arbeiðsumhvørvinum í skúlanum)?

siga seg í ávísan ella stóran mun vera nøgd við teirra arbeiði, halda skúlan vera eyðkendan av stagnation!

### *5.4.4. Leiðslan*

Næstan tríggir fjórðingar (74%) av teimum, ið hava svarað spurnarblaðnum, halda, at viðurskiftini millum lærarar og leiðslu eru góð. Men eisini her lýsa tey nøgdu viðurskiftini nógv meiri postitivt enn tey ónøgdu. Tí meðan 81% av teimum nøgdu halda, at viðurskiftini eru góð, so eru tað 54 % av teimum ónøgdu. Og meðan heili 26 % av teimum ónøgdu halda, at viðurskiftini als ikki eru góð, so eru tað einans 5 % av teimum nøgdu, sum halda hetta.

**Viðurskiftini millum leiðslu og lærarar**




Sp.: Góð viðurskifti millum leiðslu og lærarar (Lýsing av skúlanum og arbeiðsumhvørvinum í skúlanum)?

Samanumtikið lýsa tey ónøgdu í væl størri mun viðurskiftini við starvsfelagarnar negativt.

## 5.5. Fakligur førleiki

Hugsandi er, at samband kann verða millum hvussu fólk trívast í einum starvi og teirra fakliga førleika. Tað vil siga, at tey, ið føla at tey makta arbeiðsuppgávurnar væl, trívast betri. Men sum vit síggja á myndini høgrumegin, so er tað ikki nakar serligur munur á teimum nøgdu og teimum ónøgdu, hvat viðvíkur tí, ið tey halda um teirra egna fakliga førleika.

**Fakligur førleiki**




Sp.: Hvussu metir tú tín fakliga førleika vera í mun til krøvini í tínum starvi?

## 5.7. Samandráttur

Í hesum partinum er ein samanbering gjørd av, hvussu víkavist teir nøgdu og teir ónøgdu lærararnir (í kanningini) halda tað er at vera lærari.

Hendan samanberingin vísur, at tað veruligi eru munir á, hvussu tey nøgdu og tey ónøgdu lýsa viðurskiftini, og at tað eru týdningarmikil viðurskifti, sum tey ónøgdu í munandi størri mun lýsa negativt samanborði við tey nøgdu.

Tey ónøgdu halda til dømis í størri mun arbeiðisumhvørvi vera strongjandi. Tey ónøgdu taka í nakað minni mun undir við teimum nýggju tiltøkunum, sum eru knýtt at nýggju fólkaskúlalógini. Til dømis eru tað nógv fleiri av teimum ónøgdu, sum halda skrivliga ráðlegging vera eina forargiliga og óneyðuga eykað arbeiðsbyrðu, eins og tað eru færri av teimum ónøgdu, ið halda at toymini stimbra fakliga kjakið.

Hinvegin so hava bæði tey nøgdu og tey ónøgdu góð viðurskifti við næmingarnar. Tað eru tó nakað fleiri av teimum ónøgdu, sum halda tað vera trupult at gjøgnumføra ætlaðu undirvísingina og at hjálpa øllum næmingunum.

Men tá ið ávíkavist tey nøgdu og tey ónøgdu skulu lýsa tað fakliga umhvørvið, viðurskiftini við starvsfelagar og við leiðsluna, tá verða munirnir millum bólkarnar størri. Tað eru færri av teimum ónøgdu, sum halda, at tey arbeiða í einum góðum kollegialum umhvørvi (tað er tó ein meiriluti av teimum ónøgdu – 58% – ið lýsir kollegiala umhvørvið at vera gott). Eins og tað eisini eru færri av teimum ónøgdu, sum halda, at skúlin hevur eitt gott og vinarligt umhvørvið. Umframt hetta hildu heili 44% av teimum ónøgdu, at ein køvandi dámur var yvir skúlanum, meðan einans 16% av teimum nøgdu hildu hetta. Nakað fleiri av teimum ónøgdu hildu, at nógvar óloystar ósemjur vóru, eins og tað eisini vóru fleiri av teimum ónøgdu, ið hildu at fleiri ósemjur høvdu verið seinastu árini.

Metingin av fakliga umhvørvinum er eisini rættiliga ymisk. Nógv færri av teimum ónøgdu halda, at umhvørvið í skúlanum kann sigast at vera fakliga kveikjandi og spennandi. Eins og tað eisini vóru nógv fleiri av teimum ónøgdu, ið hildu, at umhvørvið var eyðkent av stagnation

# 6. Niðurstøður

Hendan kanningin hevur viðgjørt spurningin um, *hvussu tað er at vera lærari í Føroyum í dag*. Kanningin er gjørd eftir áheitan frá Føroya Lærarafelag, sum hevur verið varugt við, at trivnaðartrupulleikar eru millum lærarar í fólkaskúlanum. Endamálið við hesari kanningini er at fáa eina mynd av, hvørjir trupulleikarnir eru og hvussu útbreiddir teir eru.

Frágreiðingin er fyrst og fremst bygd á eina spurnarblaðskanning millum limirnar í Føroya Lærarafelag. Spurnarblaðið varð sent til 735 fólk og av hesum valdu 42% at svara spurnarblaðnum. Talið kundi verið hægri, men er tó nóg mikið til at kunna siga nakað munagott um hvussu støðan er millum lærarar.

Kanningin viðgerð nógv viðurskifti sum hava ávirkan á trivnaðin í skúlaverkinum. Í viðgerðini av innkomna tilfarinum eru hesi viðurskifti býtt upp í ávíkavist innanhýsis- og uttanhýsisviðurskifti. Innanhýsisviðurskiftini fevna um viðurskiftini hjá lærarum við næmingar, starvsfelagar og leiðsluna umframt hvat lærara halda um teir fysisku karmarnar í skúlunum. Uttanhýsisviðurskiftini fevna um viðurskiftini við foreldur, almennu skipanina og almenningin sum heild.

## 6.1. Almen lýsing av trivnaði lærarans

Alment kann sigast, at ein meiriluti av lærarunum í fólkaskúlanum trívast hampuliga væl. Tað eru nevnliga umleið 75%, sum siga, at tey í stóran ella ávísan mun eru nøgd við teirra starv. Í kanningin varð eisini spurt um, hvørt tey hildu teirra núverandi starv samsvarar við tað, sum tey sjálvi høvdu lýst sum "tað góða arbeiðið", og vóru tað umleið 70%, sum í stóran ella ávísan mun hildu hetta vera galdandi.

Hinvegin so vóru tað heili 25%, sum vístu á, at tey einans í minni mun ella als ikki vóru nøgd við teirra starv sum lærari. Umframt hetta vóru tað heili 47%, sum søgdu seg trívast verri nú, enn tey høvdu gjørt fyri nøkrum árum síðani. Afturat hesum var breið semja um, at trivnaðurin millum lærarar sum heild var verri nú enn hann hevði verið. Ikki minni enn 79% hildu, at ónøgdin var økt tey seinastu 10 til 15 árini, meðan bara 8% hildu at nøgdsemi var vorðið betri hetta sama tíðarskeiðið.

Eitt annað rættiliga hugvekjandi úrslit í kanningini var, at heili 54% av teimum, sum svaraðu spurnarblaðnum, søgdu seg av álvara hava umhugsað at søkja annað arbeiði seinnu árini. Og heili 83% av teimum, ið søgdu seg ikki vera nøgd við teirra arbeiði, høvdu av álvara umhugsað at søkja annað starv seinnu árini. Mest vanliga grundgevingin fyri at umhugsað at søkja annað starv var, at verandi arbeiði var ov strævið (51%). Umframt hetta vóru tað eisini nógv, sum ynsktu at royna nakað nýtt (48%) ella fáa nýggjar avbjóðingar (35%).

## 6.2. Innanhýsis viðurskifi

Viðurskiftini við næmingarnar eru ein heilt grundleggjandi partur av teimum innanhýsis viðurskiftunum. Næstan allir lærarar (91%) lýstu viðurskiftini við næmingarnar at vera góð ella sera góð. 9% hildu viðurskiftini vera nøktandi, meðan eingin helt seg hava vánalig viðurskiftini við næmingarnar. Tað vóru eisini nógvir lærarar (62%), sum hildu, at viðurskiftini vóru blivin betri seinnu árini, meðan einans 10% hildu, at tey vóru versnaði. Viðvíkjandi lýsingini av viðurskiftini í flokkunum, so hildu flestu lærarar, at næmingarnir vóru virknir, fyldu við og gjørdu soleiðis, sum lærarin segði.

Ein heilt stórur meiriluti av lærunum halda ikki, at skúlaverkið klárar sína uppgávu viðvíkjandi at hjálpa næmungum við serligum tørvi.

Nógv hevur verið tosað um, at børn eru øðrvísi í dag enn tey hava verið. Tey eru ”meiri frí” saman við vaksnum og krevja í størri mun grundgevingar fyri, hví tey skulu gera, sum tey verða biðin. Hendan kanningin vísir, at tað er ein víttfevnandi semja millum lærarar um, at uppalandi uppgávan fyllir meira í lærarastarvinum, enn hon hevur gjørt. Ikki minni enn 95% av lærarunum halda nevnliga, at uppalandi uppgávan fyllir meira samanborið við fyrr.

Ein nýggj fólkaskúlalóg varð sett í gildi í 1997. Ein av meginreglunum í hesari lógini er, at undirvísingin skal vera næmingalagað. Tað vil siga, at undirvísingin skal taka støði í tí einstaka næminginum og hansara fortreytum og menningarstigi. Ein stórur meiriluti av teimum, sum hava svarað spurnarblaðnum, halda grundleggjandi meginregluna um næmingalagaða undirvísing vera góða. Tað eru nevnliga 82%, sum hava svarað, at tey í stóran ella ávísan mun taka undir við hesari meginregluni. Hinvegin eru tað einans 3%, sum undir ongum umstøðum taka undir við hesum, meðan 12% svaraðu, at tey bara í minni mun taka undir við meginregluni um næmingalagaða undirvísining.

Meðan tað er ein stórur meiriluti, sum sigur seg taka undir við, at undirvísingin eigur at vera næmingalaga so er myndin nakað øðrvísi, tá ið lærarar skulu fremja næmingalagaða undirvísing í teirra dagliga arbeiði. Tað eru nógv (47%), sum halda seg einans í minni mun ella als ikki vera, før fyri at fremja næmingalagaða undirvísing í teirra arbeiði. Av hesum eru tað 6%, sum siga seg undir ongum umstøðum kenna seg føran at arbeiða eftir hesari meginregluni. Hinvegin eru tað 50% sum halda seg í ávísan ella stóran mun vera før fyri at fremja næmingalagaða undirvísing. Í skrivligu viðmerkingunum hava fleiri víst á, at ov høgt næmingatal í flokkunum ger tað ringt at fremja næmingalagaða undirvísing í verki. Hetta verður eisini undirbygt í spurnarkanningini við tað, at næstan 70% halda møguleikarnar at hjálpa tí einstaka næminginum nágreiniliga við hansara arbeiði vera vánaligar ella sera vánaligar.

Fyri at náa málunum um næmingalaða undirvísing, eru tað seinni árini sett krøv til lærarar um, at teir skulu gera meiri formfestar ætlanir fyri teirra frálæru. Ein partur av hesum er, at teir skulu lata inn skivliga ráðlegging í øllum lærugreinum. Næstan 90% av teimum, sum hava svarað spurnarblaðnum, hava latið inn skrivliga ráðlegging í ár. Av hesum eru tað 59%, sum halda, at skrivligu ráðleggingarnar eru góðar, tí tær gera, at støða má takast til nógv ymisk viðurskifti, og hetta kemur lææraranum til góðar seinni. Øll eru kortini ikki samd í hesum. Tað er næstan ein triðingur, sum heldur, at skrivligu ráðleggingarnar eru óneyðugar og ein forargilig arbeiðsbyrða. Hartil er tað rættiliga stórur munur á, hvat ávíkavist kvinnur og menn halda um at lata inn skrivliga ráðlegging. Meðan umleið helvtin av monnunum hildu skrivligu ráðleggingarnar vera góðar, so vóru tað næstan 70 % av kvinnunum. Og meðan 42 % av monnunum hildu skrivligu ráðleggingarnar vera óneyðugar, so vóru tað ”einans” 23 % av kvinnunum, sum hilda hetta.

Fyri at samskipa undirvísingina betur og fyri at betra møguleikarnar at fremja næmingalagaða undirvísin verður arbeitt í ráðleggingartoymum. Tað eru um 85% av teimum, sum hava svarað spurnarblaðnum, ið eru við í einum ella fleiri ráðleggingartoymum. Umleið tveir triðingar halda, at arbeiðið, sum fer fram í toymunum, stimbrar tað fakliga kjakið. Harafturímóti eru tað um 30%, sum halda, at toymini einans í minni mun ella als ikki eru stimbrandi fyri fakliga kjakið. Tað eru rættiliga nógv (40%), ið halda, at tað sum heild verður brúkt ov nógv tíð til fundarvirksemi o.l. í skúlunum.

Ein heilt stórur partur av lærarunum lýsa teirra viðurskifti við starvfelagarnar sum góð. 75% halda, at kollegiala umhvørvið, har teir arbeiða, er gott og 80% halda, at skúlin hevur eitt gott og vinarligt umhvørvi. Men hóast viðurskiftini við starvsfelagarnar vera lýst sum góð, so eru tað umleið fjórði hvør, sum heldur, at tað eru nógvar óloystar ósemjur á teirra arbeiðsplássi. Tað vóru 44% ið svaraðu, at leiðslustílurin var ein orsøk til ósemjur, meðan 31% hildu, at ov stór arbeiðsmongd og strongd hava havt ósemjur við sær. 30% hildu, at ov nógvar broytingar í senn hava ført til ósemjur. Hóast fleiri svaraðu, at leiðslustílurin har tey arbeiddu var ein orsøk til ósemjur, so merkir hetta ikki, at viðurskiftini millum leiðslunar og lærarar sum heild eru vánalig. Tvørturímóti halda 74 % í ávísan ella stóran mun, at hesi viðurskifti eru góð.

Tá ið lærarar skuldu lýsa ”tað góða arbeiði” løgdu flestu teirra dent á at hava dámligar starvsfelagar og at fáa eina góða løn. Umframt hetta, so løgdu nógvir lærarar dent á at fáa krevjandi og spennandi avbjóðingar, og kann hetta tulkast sum ynski um eitt sterkt fakligt umhvørvi. Tað er tí ørkymlandi, at meira enn helvtin av teimum, sum hava svarað spurnarblaðnum, ikki halda, at umhvørvið har tey arbeiða, er fakliga spennandi og kveikjandi, eins og tað er hugvekjandi, at 40% halda umhvørvið vera eyðkent av stagnation.

## 6.3. Uttanhýsis viðurskifti lærarans

Karmarnir fyri virksemi í fólkaskúlanum eru fastlagdir í nýggju fólkaskúlalógini. Flestu lærarar (81%) halda innihaldið í hesi lógini vera nøkulunda ella gott, og sostatt má lógin sigast at hava eina breiða undirtøku.

Flest allir lærarar (81%) halda, at teir við læraraútbúgving síni hava fingið eina nøktandi fyrireiking til lærarastarvið. Hóast hetta er tað einans ein góður fjórðingur, sum halda læraraútbúgvingina hava verið eina sera góða ella góða fyrireiking, meðan meira enn helvtin halda útbúgvingina hevur verið nøkulunda. Tað eru 20 %, sum halda, at útbúgvingin hevur fyrireika tey illa ella sera illa. Tey, ið hava tikið útbúgvingina í Danmark, eru sum heild betri nøgd við útbúgvingina, tey hava tikið.

At útbúgvingin hevur verið ein nøktandi fyrireiking hjá teimum nógvu, verður eisini undirbygt av, at flest allir lærarar meta seg hava tann fakliga førleika, sum teirra starv krevur. Men hóast hetta eru tað 17 %, sum ikki halda teirra førleika vera nóg góðan.

Allir lærarar halda, at eftirútbúgving og førleikamenning er neyðug í teirra starvi (undantikið 1 %). Tað er tí ein álvarsligur trupulleiki, at 80 % av lærarunum ikki halda møguleikarnar fyri eftirútbúgving vera nøktandi. Krøvini til lærarastarvið broytast støðugt og er tað tí neyðugt, at lærarar javnan dagføra bæði teirra námsfrøðisligu og fakligu vitan og førleika millum annað við at luttaka á skeiðum

.

Tað verður javnan ført fram, at fólkaskúlin hevur avgerandi týdning fyri føroyska samfelagið. Men hóast hetta eru tað 60 % av lærarunum, sum halda, at virðingin fyri lærarastarvinum er broytt til tað verra tey seinastu árini, meðan einans 5 % halda at virðingin er økt.

Hóast nógvir lærarar halda, at virðingin, sum almenningurin hevur fyri teirra arbeiði, er broytt til tað verra, so eru viðurskiftini millum lærarar og foreldur góð. Foreldrini hava stóran ávirkan á skúlan. Við nýggju skúlastýrunum hava foreldrini fingið størri ávirkan á skúlaleiðsluna. Og tað eru partar av frálæruni, sum best ella bert kann fara fram í samstarvi við foreldrini. Tí er tað gott, at 85 % av lærarunum halda, at viðurskifti teirra við foreldrini, sum heild eru góð, at 14 % halda viðurskiftini vera nøkulunda, og at einans 1 % hava vánalig viðurskifti við foreldrini. Umframt at viðurskiftini millum lærarar og foreldur sum heild eru góð, so eru tað umleið helvtin, sum halda, at viðurskiftini eru blivini betri seinnu árini.

## 6.4. Vandar og møguleikar

Hendan kanningin hevur viðgjørt nógv viðurskifti, ið ávirkað *hvussu tað er at vera lærari í Føroyum í dag* og harvið trivnaðin í skúlaverkinum.

Samanumtikið ber til at siga, at nógv halda tað sum heild vera gott at vera lærari, tí um vit siga, at kjarnan í lærarastarvinum er:

- Undirvísingin
- Viðurskiftini við næmingarnar
- Viðurskiftini við starvsfelagarnar
- Viðurskiftini við foreldrini
- Viðurskiftini við leiðsluna

So gevur hendan kanningin, sum heild eina positiva mynd, tí:

- Flest allir lærarar siga seg hava góð viðurskifti við næmingarnar
- Flestu lærarar siga seg hava tað gott saman við starvsfeløgunum
- Flestu lærarar siga seg hava góð viðurskifti við foreldrini
- Flestu lærarar siga seg hava góð viðurskifti við leiðsluna

Um vit halda fast við, at hetta er kjarnan í starvinum, so merkir hetta harvið, at flestu lærarar eru nøgdir við sítt starv. Flestu lærarar hava eisini svarað, at teir í ein ávísan mun ella í stóran mun eru nøgdir í sínum starvi. Harumframt svaraðu umleið 70 % eisini, at teirra starv í ein ávísan mun livdi upp til tað, sum tey skiltu við ”tað góða arbeiðið”.

Hinvegin vísir kanningin eisini greitt, at stórir trupulleikar eru. Breið semja er um, at ónøgdin millum lærarar er blivin størri. Nógvir lærarar siga seg eisini vera minni nøgdar við arbeiði enn teir hava verið. Og meira enn helvtin av teimum, sum hava svarað spurnarblaðnum, siga seg av álvara hava umhugsað at søkja annað starv. Umframt hetta halda nógv av teimum, sum hava svarað:

- At arbeiðstíðin ikki strekkir til
- At tað er ringt at fremja næmingalagaða undirvísing.
- At tann uppalandi uppgávan fyllir meira nú, í mun til fyrr.
- At virðingin fyri lærarastarvinum frá almenninginum er minkandi.
- At skúlaverkið ikki megnar at taka sær av næmingum við serligum tørvi
- At møguleikarnir fyri eftirútbúgving als eru ikki nøktandi

Samanumtikið vísir kanningin sostatt, at tað bæði hómast vandar og møguleikar í framtíðini hjá fólkaskúlanum. Vandin er, at tann negativa gongdin sleppur at halda fram, so at frustrationirnar vaksa og nøgdsemi minkar, og lærarar fara at støðast enn verri í fólkaskúlanum og í enn størri mun søkja sær onnur størv.

Hinvegin vísir kanningin eisini, at flestu lærarar sum heild hava tað gott saman við næmingunum og gott saman við foreldrum. – Og tá nógvir lærarar eisini halda, at viðurskiftini við leiðsluna og starvsfelagar eru góð, so má staðfestast at eitt gott grundarlag er til staðar fyri at betra um støðuna. Hetta kann geva starvsfólki innan

fólkaskúlan áræði at arbeiða við at betra um trivnaðin. Her verður bæði hugsað um myndugleikarnar, skúlaleiðslurnar, umframt teir einstaku lærararnar.

## Keldulisti

**Bysted Kommunikation A/S** (1996) *Danmarks Lærerforening. Medlemsundersøgelsen 1996*

**Christiansen, J. M.** (1994) *Psykisk arbejdsmiljø blandt medlemmer af Danmarks Lærerforening,*Center for Alternativ Samfundsanalyse, København.

**Fólkaskúlalógin** – ein avbjóðing, 2001, Mentamálastýrið

**Hagstova Føroya** (2001) *Árbók fyri Føroyar 2001*. Tórshavn: Hagstovan.

**Heise, I.** (1998) *Lærerliv*, Undervisningsministeriet

**Hovgaard, G.** (1998). *At lesa seg av bygdini. Um leiklut skúlans í nútíðar samfelagnum*, í **Dahl, Á.(**ritstj.) Føroya Lærarafelag 100 ár. Tórshavn: Bókadeild Føroya Lærarafelags.

**Jacobsen, B.; S. Juul; Laursen, E. og. Rasborg, K.** (1998) *Sociologi og Modernitet*. Columbus.

**Kreiner, S. & Mehlbye, J.** (2000) *Arbejdsmiljøet i Folkeskolen*, AKF Forlaget

**Lesiætlanarnevndin** (1993) *Fólkaskúlin. Tíma- og lærugreinabýti* Landskúlafyrisitingin.

Løgtingslóg nr.125 frá 20 mai 1997 um fólkaskúla, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22.december 2000.

**Ráðleggingarnevnd Fólkaskúlans** (1996) *Álit um nýggja fólkaskúlalóg*, Landsskúlafyrisitingin.

**Thomsen, R.** (1998) *Skúlin á veg inn í eitt nýtt túsundár*. í Dahl, Á. (ritstj.) Føroya Lærarafelag 100 ár. Tórshavn: Bókadeild Føroya Lærarafelags

**Útbúgvingarpolitiknevndin** (1998) *Føroyskur Førleiki* Føroya Landsstýri.